FRÁGREIÐING

# Føroya Fuglafrøðifelag

**Nr. 2 · 1998**

**12. árgangur**

# Innihaldsyvirlit


Fuglar við fleiri enn einum heiti 5

Eygleiðingar av fugli frá strandfarðaskipinum »Ternuni« 6

Nøvn til firvaldar *Lepidoptera* í Føroyum 9

Lundafráboðanir í 1998 13

Helsareyði og Bringureyði 15

Fuglar sæddir í Føroyum 1998 16

Túrur út á Borðina 17

Minnir 18

Tjøldrini og lesullin 19

Øll tosa um veðrið, og onkur ger eisini okkurt við tað 20

Á ferð í Hattarvík 21

Amerikansk kolont 25

Fuglalisti 26

Frá aðalfundinum 27

Útferðin til Gásadals 29

**Útgevari:**
Føroya Fuglafrøðifelag,
Postsmoga 1230,
110 Tórshavn.

**Blaðstjórn:**
Nevndin.

**Endamál felagsins:**
Fuglafrøðifelagið er landsfelag hjá fólki, ið hevur áhuga fyri fugli og vernd av fugli.

**Limagjald:**
Vanliga limagjaldið er 125 kr. fyri einstaklingar og 175 kr. fyri pør.
Unglingar gjalda tó einki fyrr enn teir fylla 15 ár,
og frá 15 til og við 19 ár er gjaldið 75 kr. fyri einstaklingar og 100 kr. fyri pør.
Hetta minna limagjaldið er eisini fyri lesandi og fyri tey, ið eru eldri enn 66 ár.

**Limatekning:**
Ein teknar seg sum lim við at gjalda limagjaldið á postgirokonto nr. 59706,
Føroya Fuglafrøðifelag,
Postsmoga 1230,
110 Tórshavn.

**Nevnd:**
Petur Mortensen (fm.)
Erik Mortensen (nf. skr.),
Jutta Nielsen, Anna á Argjaboða og Eyðfinn Magnussen.

**Eykalimir:**
Lív Dam og Sólbjørn Jacobsen.

# Fuglar við fleiri enn einum heiti

*Savnað: Fríðleif Lydersen*

Øssvartur Lómur - Stór Lómur. Havgás - Imbrimil - Helsiont.
Nevgulur Lómur - Nevgul Havgás.
Gjør - Sevont.
Havhestur - Náti.
Stórskrápur - Havskrápur.
Gráskrápur - Dimmur Havskrápur.
Drunnhvíti - Havtyrðil - Vendingarfuglur - Velhvíti.
Hegri - Hakaspjað.
Íslandsgás - Svalbarðgás.
Øshvít Gás - Kanadagás.
Ennigul Ont - Pípont - Snjalla.
Svanur - Okn.
Snælduont - Stikkont.
Krikont - Stikkont.
Gråbøkut Ont - Gråbøka.
Ógvella - Óerla - Egvølla.
Íslensk Súgont - Íslensk Hvinont.
Súgont - Hvinont
Fiskiørn - Gjóðu.
Kongaørn - Landørn.
Grýtusmuril - Tornfalkur.
Vaktil - Lynghøna.
Helsareyði - Hálsareyði - Sildhøna.
Sundagrælingur - Tórshani.

Ungin hjá Skrápi veður nevndur Líri, hjá Álku og Lomviga blívur hann kallaður Steffa.

Æða kallast nonfuglurin hjá fuglaslagnum við sama navnið, men steggin verður rótptur Æðurblikur ella Blikur

Kvørkveggja - Kvørkviski - Kverkveggja - Rókur
Íslandsgrælingur - Grágrælingur.
Tjaldursgrælingur - Fjørutjaldur.
Grágrælingur - Sjógrælingur.
Tjaldur - Nornagestur - Gestur - Nevið Reyða.
Vendisnípa - Skógsnípa.
Lítil Mýrisnípa - Fjallasnípa.
Brandmási - Rósumási.
Svartbakur - Bakur.
Skatumási - Lortamási - Skata - Gneggjus - Válkur.
Lítil Valmási - Íslandsmási.
Íslandslomvigi - Stuttvigi.
Kattúla - Hornugla.
Uglubóndi - Kattúla.
Herfuglur - Búðhøna - Faksingur.
Títlingur - Summargrátítlingur.
Grátítlingur - Fjørugrátítlingur.
Mortítlingur - Músabróður
Bringureyði - Reyðbrystingur.
Títlingskongur - Fuglakongur.
Felliskráka - Hjaltakráka.
Ravnur - Krunkur - Gorpur.
Brandstari - Reyðstari.
Prýðisígða - Dónpápi.
Snjófuglur - Snótítlingur.

Ungfuglurin hjá Súlu blívur kallaður Ompil ella grásúla, hjá Másafuglinum verður ungfuglurin róptur Skurið.

Lundin, sum ber lundapisuni føði, verður nevndur Sildberi.

***Bókmentir***


Alstrøm, Christer, 1998. Raportir frá Christer Alstrøm. Frágreiðing frá Føroya Fuglafrøðifelag, síða 8, nr. 1, 12 árg. 1998.

Bloch, Dorete & Sørensen, Søren, 1984. Yvirlit yvir Føroya Fuglar. Føroya Skúlabókagrunnur 1984.
Jacobsen, M. A. & Matras, Chr., 1961. Føroysk-Donsk Orðabók. Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn 1961.

Olsen, Bergur, 1998. »Víða um«. Frágreiðing frá Føroya Fuglafrøðifelag, síða 19, nr. 1, 12 árg. 1998.

Petersen, Hjalmar P. & Staksberg, Marius, 1995. Donsk-Føroysk Orðabók. Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn 1995.

Poulsen, Jóan Hendrik W. 1997. Um orðið Tjaldur. Síða 20-21 í Frøði nr. 1, August 1997.

Ryggi, Mikkjal á, 1978. Fuglabókin. Føroya Skúlabókagrunnur, Tórshavn 1978.

Skarði, Jóannes av, 1977. Donsk - Føroysk Orðabók. Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn 1977.

Sørensen, Søren & Bloch, Dorete, 1990. Fuglar í Norðurhøvum. Føroya Skúlabókagrunnur Tórshavn 1990.


**Munnligar keldur:**
Eldri Skálvíkingar

# Eygleiðingar av fugli frá strandfarðaskipinum »Ternuni«

Eygleiðingar av fugli frá strandfarðaskipinum »Ternuni« frá Leirvík til Klaksvíkar, 1988-89.

*Hans Guldager Christiansen*

**Inngangur:**
Í tíðarskeiðnum august 1988 til juli 1989 var eg lærari við Eysturoyar studentaskúla og Klaksvíkar HF-skeið, og skuldi í tí sambandi ferðast tvær ferðir um vikuna til Klaksvíkar. Hesa tíðina skrásetti eg allar fuglar, sum eg sá frá »Ternuni«, á túrunum millum Leirvík og Klaksvík.

**Arbeiðsháttur:**
Á mynd 1 sæst leiðin hjá »Ternuni«. Leiðin gongur tætt framvið Galvinum og vestaru strondini á Borðoynni, tað veldst um streymviðurskifti og ætt. Siglingin er ein 1/2 tíma. Øll fuglasløg sum við vissu kundu kennast, eru skrásett. Tó eru fuglar, sæddir inni í havnini, ikki tiknir við. Eg brúkti ein vanligan kikara 8x40.

Fyri hvønn túr eru sløgini, eg sá, skrásett, men ikki talið. Tó eru tølini fyri lomvigar og álkur *Alka torda* skrásett, tí hesir fuglarnir vóru rættiliga fáir.

Eftir at hava eygleitt nakrar tímar, vísti tað seg, at mest fuglur sást, um hugt varð frá skipinum og inn móti landi. Tá leiðin gekk frá Klaksvík til Leirvíkar, varð fyrst hugt í bakborðsíðu millum Borðoy og Kallsoy frá stýriborð. Hesin háttur bleiv brúktur frá ultimo september, men vegna veður læt hettar seg ikki altíð gera. Eygleiðingarnar í august mánaða kunnu tí ikki heilt samanberast við hinar, til dømis eru ongar æður *Somateria mollissima* skrásettar, tá eg eygleiddi á leiðini burtur frá landi og úteftir.

Við fáum undantøkum er talt tvær ferðir um vikuna. Tíðarskeiðið á degnum var skiftandi, og mátti tilpassast, tá eg hevði ørindi í Klaksvík. Umframt fuglasløgini, varð klokka, hiti, ætt, vindmegi og sýnið skrásett.

**Úrslit:**
Úrslitini síggjast á talvu 2 á síðu 8. Kanningin varð gjørd í tíðarskeiðinum frá 26. august 1988 til 24. juni 1989.

Hesi fuglasløg vóru sædd stórt sæð á hvørjum túri: náti (havhestur) *Fulmarus glacialis*, æða, fiskimási *Larus argentatus*, svartbakur *Larus marinus*, ryta *Rissa tridactyla*, og teisti *Cepphus grylle,* náti sást tó ikki frá miðjan oktober til desember.

Millum støðufuglarnar sum oftast sóust, var skarvur *Phalacrocorax aristoteles*.

Nøkur sløg eru, sum flyta um veturin tey eru: Súla, likka *Larus fuskus*, terna *Sterna paradisea*, og sum sagt eisini náti. Tvey sløg sum halda til nær landi, og sum vóru nógv at síggja, vóru fransaterna *Larus ridibundus* og skatumási (*Larus canus*).

Av vanligum sjófugli, var lítið til av: Kjógva *Stercorarius parasiticus*, lómvigu, álku, og lunda *Fratercula arctica*.

Av og á sóust fuglar, sum vanliga halda til á landi, flúgva millum oyggjarnar: Villdunna *Anas plathyrhynchus*, tjaldur *Haematopus ostralegus*, tjaldursgrælingur *Arenariainterpres*, smyril *Falco columbarius*, kráka *Corvus corone*.

Tveir vetrargestir vóru eisini at síggja: Valmási *Larus hyperboreus*, og havgás *Gavia immer*.



Mynd 1. Siglingarleiðin hjá Ternuni millum Leirvík og Klaksvík.

**Umrøða:**
Teljingarhátturin hevur sínar veikleikar. Tey stóru fuglasløgini vóru oftari at síggja enn tey smærru. Til dømis sást súla *Sula bassana* í fleiri kilometra frástøðu, meðan ein lomviga *Uria aalge*, ið flýtur á sjónum, er ring at síggja. Hettar er heldur ikki nøkur nøktandi kanning. Í byrjaðnini royndi eg at avmarkað økið til at verða 300 m. runt um skipið. Har taldi eg so hvønn einstakan fugl, men hetta er ikki gjørligt við einum vanligum kikara at avmarka seg til eitt slíkt økið. Teir mongu

tímarnir, ið hugt varð, geva tó eina góða mynd av, hvussu vanlig tey ymisku fuglasløgini eru.

**Fuglameingi:**
Náti (havhestur) var tað slagið, sum mest var av. Í august og september vóru næstan altíð ein ella fleiri at síggja. Seinast í september minkaði talið skjótt. Tann 18. desember sóust umleið 20 nátar aftaná einum útróðrarbáti, men annars vóru eingir at síggja allan oktober og november mánaða. Tann 6. desember vóru teir aftur at síggja. Tað var í einum tíðarskeiði við vánaligum veðri. Frá 20. desember sóust nátar á reiðurstøðum á suðurendanum á Kallsoynni, og vóru teir at síggja í vaksandi tali.

Æður og teistar sóust oftast fram við strondini. Hettar er orsøkin til tær vantandi skrásetingarnar í august og september. Lítið var at síggja av báðum sløgum, tó sóust í mesta lagi 30 teistar á einum túri.

| Dato | Alk | Lomvie | Alk/lomvie |
|---|---|---|---|
| 18.10 | | | 1 |
| 15.11 | | | 1 |
| 16.11 | 2 | | |
| 13.12 | | | 1 |
| 14.12 | | | 1 |
| 04.01 | | | 1 |
| 16.01 | | 1 | |
| 23.01 | | 1 | |
| 30.01 | | 5 | |
| 31.01 | 1 | | |
| 01.02 | | 1 | |
| 06.02 | | 1 | |
| 08.02 | | 2 | |
| 20.02 | | 1 | |
| 22.02 | | 2 | |
| 27.02 | | 1 | |
| 01.03 | | 1 | |
| 13.03 | | 2 | |
| 08.05 | 2 | 1 | |
| 22.05 | | 3 | |
| 19.06 | | 1 | |
| 23.06 | | 1 | |

Talva 1. Tal av svartfugli talt frá »Ternuni«, 1988-1989.

Fiskimási og svartbakur eru somuleiðis støðufuglar. Tað vóru fleiri fiskimásar enn svartbakar. Hesir vóru at síggja alt árið, eina til nakrar ferðir á næstan hvørjum túri.

Tað seinasta av teimum vanligu sløgunum er ryta. Um veturin sóust rættiliga fáar, men út á várið sóust tær mest í flokkum. Í Bloch og Sørensen (1983) flytifuglakanningar í Akrabergi, næst nátanum, var rytan tað fuglaslagi, ið oftast var at síggja

Flytingin hjá teimum føroysku fuglunum er nágreiniliga viðgjørd, av td. Salomonsen (1982) og Sørensen & Bloch (1990). Upplýsingar um fráferð og afturkomu hjá flytifuglinum samsvara væl við eygleiðingarnar í hesi kanning, talva 2.

Um støðufuglar, ið javnan eru at síggja í okkara sjóøkið, kann sigast, at topskarvur og fransaterna fyri tað mesta síggjast nær havnalagnum. Skatumási verður eisini roknaður sum føroyskur støðufuglur (Joensen, 1966; Reinert, 1977), meðan teir í hesi kanning ikki sóust fyrrenn í apríl og aftaná. Orsøkin er tíverri tann, at eygleiðarin var óroyndur og hevði yvirsæð slagið um heystið og í vetrarhálvuni.

Í hesi kanningini eru tað óvanliga fáir lomvigar, sí talvu 1. Orsøkin er tann stóra niðurgongd í lomvigastovninum. Sambært Olsen (1986) verður mett at falli í stovninum er umleið 70-90% síðan 1950unum. Sørensen & Bloch (1990) skriva meira varisliga, at føroyski lomvigastovnurin er minkaður meira enn helvtina, til undir 200.000 pør eftir ca. 30 ár. Men tað ávirkar eisini úrslitið, at fuglabjørgini liggja rættiliga langt frá siglingarleiðini hjá Ternuni.

Sum ávíst í talvu 1 og 2 sóust álka og lundi bert fáar ferðir. Tað kann vera ringt at kenna ungálku *juvenil* frá lomviga, tí er ein 3. teigur í talvu 1.

Av tí at lundi er millum talríkastu sjófuglar í Føroyum, er tað undrunarsamt, at hann bert er sæddur tvær ferðir, men har er einki lundaland nær við, og teir taka neyvan føði í hesum økinum.

Hinar eygleiðingarnar nýtast ikki viðmerkingar.

Við 80 túrum t.v.s. ca. 40 tímars eygleiðing, vóru íalt 24 fuglasløg at síggja. Tað má staðfestast, at tað eru ikki nógv fuglasløg á teimum norðastu firðunum og sundunum í Føroyum. Tað sama er galdandi fyri talið av fugli á hesi farleið.

Bert eina ferð varð súgdjór skrásett. Tað var tann 19. juni 1989, har ein láturkópur *Halichoerus grypus* var at síggja, nær havnini í Leirvík. Annars var tað í kanningartíðini tríggjar ferðir grind í Fuglafirði.

**Bókmentir**

Bloch, D. & S. Sørensen: The autum migration at Akraberg, Faroe Island, 1982. – Fróðskaparrit 31: 75-93

Joensen, A. H. 1966: Fuglene på Færøerne. – Rhodos, København.

Olsen, B. 1986: Støðan hjá tí føroyska lomviga- og álkustovninum. – Fiskirannsóknarstovan, Tórshavn.

Reinert, A. 1977: Sea-birds of the Faroes. – I: Nørrevang og Lundø (Red): Færøernes Natur. Særudgave af Danmarks Natur, bd. 12. Politikens Forlag.

Sørensen, S. & D. Bloch 1990: Fugle i Nordatlanten. – G.E.C. Gad, København.


*Frá frumritinum:*
Fugleobservationer fra færgen »Ternan«, fra Leirvík til Klaksvík, Færøerne, af Hans Guldager Christiansen.

*Umsett hevur Petur Mortensen*

| | aug. | september | oktober | november | desember | januar | februar | mars | apríl | mai | juni |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Havgás** | | | | x | | | | | | | |
| **Havhestur** | xxx | xxxxxxx x | x | | x xxx | xxxxxxxx | x x xxxx | xxxxx | xxxxxxx | xxxxxxxx | xxxxxx |
| **Súla** | x | x x x | x | | | | | x | xxx | x | x |
| **Skarvur** | | x x | x | xx x xx | x xx | x xx x | xxxxxxx | x x x | x x x | x | |
| **Villdunna** | | | | | | | | | | x | |
| **Æða** | | x xxxxxx | xxxxxx | x xxxxxxxx | xxxxxxx | xxxxxxxxx | xxxxxxxx | xxxxxxx | xxxxxxx | xxxxxxxx | xxxxxx |
| **Smyril** | | | x | | | | | | | | |
| **Tjaldur** | | | | | | | | | xx | x x | x x |
| **Tj. grælingur** | | | | x | | | | | | | |
| **Kjógvi** | | | | x | | | | | | | |
| **Fransaterna** | | x xx | | | | | | | x x | x xx xxx | x |
| **Skatumási** | | | | | | | | | xx xx | xx xx | xx |
| **Likka** | | xxx | | | | | | | x xxx | xxx xxx | xxxxxx |
| **Fiskimási** | xxx | xxx xx xx | xxxxxx | xxxxxxxxxx | xxxxxxx | xxxx xxxx | xxxxxxxx | xxxxxxx | xxxxxxx | xxx xxx | xxxxx |
| **Valmási** | | | | | | x x | | | | | |
| **Svartbakur** | x | xxx xx xx | xxxxxx | xx xxxxxxx | x xx x | xxxx xxx | xxxxx x | xxxxxxx | xxxx xx | xxxxxxxx | xx xx |
| **Ryta** | x x | xxxxxx x | xxxxx | xxxxxxxxx | | xxxxxxxxx | xxxxxxxx | x xxxxx | xxxxxxx | xxxxxx | xxxxxx |
| **Terna** | x x | x x | | | | | | | | xxx | xxxxxx |
| **Lomvigi** | | | | | | x x x | xxx xxx | x x | x x | x x | x x |
| **Álka** | | | | x | | x | | | | x | |
| **Teisti** | xx | xxx x | xxx xx | xxxxxxxxxx | x xxxx | xxxxxxxx | xxxxxxxx | xxxxxxx | xxxxxxx | xxxxxxxx | xxxxxx |
| **Lundi** | | | | | | x | | | | x | |
| **Kráka** | | | x | x | | x | | | x | x | |
| **Ravnur** | | | | | | | | x | | | |
| | | | | | | | | | | | |

Talva 2

# Nøvn til firvaldar *Lepidoptera* í Føroyum

(Names for moths and butterflies on the Faroes)
(This list is not a check list)

**Jens-Kjeld Jensen • Annleyg Patursson**

Nøvnini í hesum lista eru ætlað til firvaldar, sum antin eru, ella kunnu væntast at verða sæddir í Føroyum. Vit hava roynt at leggja dent á at nýta sama arbeiðslag, sum Leif Dahl nýtti á sinni við hefti sínum »Firvaldar« frá 1956. Síðan Leif Dahl gav út hetta hefti, eru fleiri av latínsku nøvnunum broytt. Har nýggj nøvn eru komin, hava vit fyrst skrivað tað nýggja latínska navnið (sambært Karsholt and Razowski, 1996) og á regluni niðriundir hava vit skrivað tað navnið, ið Leif Dahl nýtti.

Vit takka hesum fyri hollan stuðul í arbeiði okkara: Keith Bland, Skotlandi. Maritu Gulklett, Føroyum. Erlingi Ólafssyni, Íslandi. Øystein Patursson, Føroyum. Johan Hendriki W. Poulsen, Føroyum. Uffe Senica, Danmark og Ingvar Svensson, Svøríki. Somuleiðis takka vit teimum, sum hava lisið og havt til ummælis »Navnauppskot til firvaldar í Føroyum«.

HEPIALIDAE
**Hulduættin**
*Hepialus humuli* (Linnaeus, 1758)
**Hulda**

TINEIDAE
**Fjaðramølaættin**

*Tineola bisselliella* (Hummel, 1823)
**Klæðishúsvætti**
*Tinea pallescentella* Stainton, 1851
**Húsvætti ljósa**
*Monopis laevigella* (Denis & Schiffermüller, 1775)
*Monopis rusticella* Hb.
**Húsvætti svarta**

GRACILLARIIDAE
**Vænmølaættin**

*Caloptilia elongella* (Linnaeus, 1761)
**Viggmølur**
*Aspilapteryx tringipennella* (Zeller, 1839)
**Gøtubráarmølur**



Veingjaguli *Noctura pronuba*. *Mynd: Mogens Frost Christensen*

PLUTELLIDAE
Kálmølaættin

*Plutella xylostella* (Linnaeus 1758)
*Plutella marculipennis* Curt
**Kálmølur**
*Rhigognostis senilella* (Zetterstedt, 1839)
*Plutella senilella* Z.
**Skriðublómumølur**
*Rhigognostis annulatella* (Curtis, 1832)
**Eirisgrasmølur**

DEPRESSARIIDAE
**Flatmølaættin**

*Depressaria badiella* (Hübner, 1796)
**Flatmølur**

ELACHISTIDAE
**Slokumølaættin**

*Elachista albidella* Nylander, 1848
**Fípumølur**

OECOPHORIDAE
**Húsvættaættin**

*Endrosis sarcitrella* (Linnaeus, 1758)
*Endrosis lacteella* Shiff.
**Húsvætti gráa**
*Hofmannophila pseudospretella* (Stainton,1849)
**Húsvætti brúna**

COLEOPHORIDAE
**Bjølgmølaættin**
*Coleophora serratella* (Linnaeus, 1761)
**Birkimølur**

*Coleophora glaucicolella* Wood, 1892
**Sevmølur**
*Coleophora versurella* Zeller, 1849
**Rímbløðkumølur**

GELECHIIDAE
**Glermølaættin**

*Euscrobipalpa samadensis* (Pfaff, 1870)
**Sævargøtubráarmølur**

TORTRICIDAE
**Vevjarar**

*Acleris comariana* (Lienig & Zeller, 1846)
**Jarðberjavevjari**
*Acleris maccana* (Treitschke, 1835)
**Bláberjavevjari**
*Acleris sparsana* (Denis & Schifferm., 1775)
**Lynvevjari**
*Acleris aspersana* (Denis & Schiffermüller, 1775)
**Muruvevjari**
*Acleris notana* (Donovan, 1806)
*Acalla ferrugana* Tr.
**Birkivevjari lítli**
*Eutrachia osseana* (Scopoli, 1763)
*Cnephasia osseana* Scop.
**Grasfirvaldur lítli**
*Bactra lancealana* (Hübner, 1799)
*Bactra lanceolana*
**Sevvevjari**
*Phiaris schulziana* (Fabricius, 1776)
*Argyroploce schulziana* Fabr.
**Lyngvevjari**
*Lobesia littoralis* (Westw. & Humph., 1845)
*Polychrosis littoralis* Curt
**Sjógrasvevjari**
*Epinotia caprana* (Fabricius, 1798)
**Pílavevjari**
*Epinotia solandriana* (Linnaeus, 1758)
*Epiblema solandriana* L.
**Birkivevjari stóri**
*Epinotia mercuriana* (Frølich, 1828)
*Pamplusia mercuriana* Hb.
**Brúðarvevjari**
*Zeiraphera griseana* (Hübner, 1799)
*Eucosma diniana* Gn.
**Furuvevjari**

PTEROPHORIDAE
**Bløkumølaættin**

*Stenoptilia bipunctidactyla* (Scopoli, 1763)
**Bløkumølur**

PYRALIDAE
**Grasmølaættin**

*Paralipsa gularis* (Zeller, 1877)
*Aphomia gularis* Z.
**Suðurfruktarmølur**
*Dioryctria abietella* (Denis & Schiff., 1775)
**Kongulmølur**
*Plodia interpunctella* (Hübner, 1813)
**Kornmølur**
*Anagasta kuehniella* Zeller, 1879
*Ephestia kuehniella* Z.
**Mjølhúsvætti**
*Scoparia ambigualis* (Treitschke, 1829)
*Scoparia ambigualis* Tr. Atomalis Stt.
**Eingjarmølur**
*Crambus pascuella* (Linnaeus, 1758)
*Crambus pascuellus* L.
**Eingjargrasmølur**
*Crambus ericella* (Hübner, 1813)
*Crambus ericellus* Hb.
**Hagagrasmølur**
*Catoptria furcatellus* (Zetterstedt, 1839)
*Crambus furcatellus* Z.
**Fjallagrasmølur**
*Udea ferrugalis* (Hübner, 1796)
*Pionea ferrugalis* Hb.
**Grasmølur guli**
*Udea lutealis* (Hübner, 1809)
**Tistilmølur**
*Margaritia sticticalis* (Linnaeus, 1761)
**Dimmimølur**
*Nomophila noctuella* (Denis & Schiff. 1775)
**Ferðamølur**

SPHINGIDAE
**Kvøldsveimaraættin**

*Agrius convolvuli* (Linnaeus, 1758)
*Herse convolvuli* L.
**Kongsfirvaldur**
*Acherontia atropos* (Linnaeus, 1758)
**Náhøvur**
*Hyles galii* (Rottemburg, 1775)
**Drotningarfirvaldur**

PIERIDAE
**Fiðrildaættin**

*Pieris brassicae* (Linnaeus, 1758)
**Hvítfiðrildi**
*Pieris rapae* (Linnaeus, 1758)
**Snjófiðrildi**
*Pieris napi* (Linnaeus, 1758)
**Grønteinut fiðrildi**
*Colias croceus* (Fourcroy, 1785)
**Brandgult fiðrildi**

NYMPHALIDAE
**Álvaættin**

*Vanessa atalanta* (Linnaeus, 1758)
*Pyrameis atalanta*
**Admirálur**
*Vanessa cardui* (Linnaeus, 1758)
*Pyrameis cardui*
**Tistilfirvaldur**

*Inachis io* (Linnaeus, 1758)
*Vanessa io*
**Páfirvaldur**
*Aglais urticae* (Linnaeus, 1758)
*Vanessa urticae*
**Notufirvaldur**
*Nymphalis antiopa* (Linnaeus, 1758)
**Randarfirvaldur**
*Danaus plexippus* (Linnaeus, 1758)
**Keisarafirvaldur**

GEOMETRIDAE
*Spannarar*

*Abraxas grossulariata* (Linnaeus, 1758)
**Skjóruspannari**
*Orthonama obstipata* (Fabricius, 1794)
**Miðjarðarhavsspannari**
*Xanthorhoe designata* (Hufn.1767) faeroensis Wolf 1929
*Cidaria designata* Hufn. faeroensis W.
**Várspannari**
*Xanthorhoe decoloraria* (Esper, 1806)
*Cidaria munitata* Hb.
**Skøruspannari**
*Xanthorhoe fluctuata* (Linnaeus, 1758)
*Cidaria fluctuata*
**Kálspannari**
*Entephria caesiata* (Denis & Schifferm., 1775)
*Cidaria caesiata* Schiff.
**Klettaspannari**
*Chloroclysta miata* (Linnaeus, 1758)
**Jaspisspannari**
*Chloroclysta citrata* (Linnaeus, 1761)
*Cidaria citrata* L.
**Marmorspannari**
*Operophtera brumata* (Linnaeus, 1758)
**Frostspannari**

*Perizoma blandiata* (Denis & Schiffermüller, 1775)
*Cidaria blandiata* Schiff.
**Eingjarspannari**
*Perizoma albulata* (Denis & Schiffermüller. 1775)
*Cidaria albulata* Schiff.
**Summarspannari**
*Perizoma didymata* (Linnaeus, 1758)
*Cidaria didymata* L.
**Heystspannari**
*Eupithecia satyrata* (Hübner, 1813) *curzoni* (Gregson, 1884)
**Lyngspannari**
*Eupithecia nanata* (Hübner, 1813) *zebrata* Wolf
**Dvørgspannari**
*Eupithecia pusillata* (Denis & Schiffermüller, 1775)
**Baraldsspannari**

NOCTUIDAE
**Heygsmenn**

*Catocala fraxini* (Linnaeus, 1758)
**Blábendil**
*Scoliopteryx libatrix* (Linnaeus, 1758)
**Skarðvongur**
*Autographa gamma* (Linnaeus, 1758)
*Phytometra gamma* L.
**Gammavongur**
*Autographa pulchrina* (Haworth, 1809)
**Korkavongur**
*Caradrina morpheus* (Hufnagel, 1766)
**Gestvongur**
*Paradrina clavipalpis* (Scopoli, 1763)
**Mjølvongur**
*Spodoptera exigua* (Hübner, 1808)
**Mjávongur**
*Phlogophora meticulosa* (Linnaeus, 1758)
*Trigonophora meticulosa* L.
**Skreytvongur**

*Enargia paleacea* (Esper,1788)
**Sóljuvongur**
*Parastichtis suspecta* (Hübner, 1817)
**Aspvongur**
*Agrochola circellaris* (Hufnagel, 1766)
**Morvongur**
*Eupsilia transversa* (Hufnagel, 1766)
**Mánavongur**
*Xylena vetusta* (Hübner, 1813)
**Kjarrvongur**
*Mniotype adusta* (Esper, 1790) *sommeri* (Lefèbvre)
*Crino sommeri* Lef.
**Landnámsfirvaldur**
*Apamea monoglypha* (Hufnagel, 1766)
*Parastichtis monoglypha* Hufn.
**Grasfirvaldur stóri**
*Apamea crenata* (Hunagel, 1766)
**Flekkuvongur**
*Apamea zeta* (Treitschke, 1825)
*Crymodes exulis* Lef.
**Rossafirvaldur**
*Apamea remissa* (Hübner, 1809)
**Sprøkluvongur**
*Rhizedra lutosa* (Hübner, 1803)
**Fenvongur**
*Amphipoea lucens* (Freyer, 1845)
**Fjallafípuvongur**
*Hydraecia micacea* (Esper, 1789)
**Mækjuvongur**
*Celaena haworthii* (Curtis, 1829)
**Fípuvongur**
*Chortodes stigmatica* (Eversmann, 1855)
**Sandvongur**
*Discestra trifolii* (Hufnagel, 1766)
**Vøkkulvongur**
*Hada plebeja* (Linnaeus, 1761)
*Mamestria dentina* Esp.
**Tannavongur**
*Mamestra brassicae* (Linnaeus, 1758)
**Klóvongur**
*Mythimna unipuncta* (Haworth, 1809)
**Rótarvongur**

*Cerapteryx graminis* (Linnaeus, 1758)
**Ormafirvaldur**
*Diarsia mendica* (Fabricius, 1775), *borealis* (Zetterstedt, 1839)
**Roðavongur**
*Noctua pronuba* Linnaeus 1758
*Rhyacia pronuba* L.
**Veingjaguli**
*Noctua orbona* (Hufnagel, 1766)
**Blettvongur**
*Lycophotia porphyrea* (Denis & Schiffermüller, 1775)
*Rhyacia porphyrea* Schiff.)
**Porfýrvongur**
*Standfussiana lucernea* (Linnaeus, 1758)
*Rhyacia lucernea* L.
**Steinbrotsvongur**
*Paradiarsia glareosa* (Esper, 1788)
**Jarpvongur**
*Eurois occulta* (Linnaeus, 1758)
**Mosavongur**
*Xestia alpicola* (Zett., 1839) *alpina* (Humphreys & Westwood)
*Rhyacia alpicola* Zett.
**Bláberjavongur**
*Xestia c-nigrum* (Linnaeus, 1758)
**Kulluvongur**
*Anaplectoides prasina* (Denis & Schiffermüller., 1775)
**Bordavongur**
*Peridroma saucia* (Hübner, 1808)
**Opalvongur**

*Agrotis ipsilon* (Hufnagel, 1766)
*Rhyacia ypsilon* Roth
**Perluvongur**
*Agrotis segetum* (Denis & Sciffermüller, 1775)
**Akurvongur**

ARCTIIDAE
**Miklingaættin**

*Arctia caja* (Linnaeus, 1758)
**Tikaravongur**
*Antichloris viridis* (Druce)
**Bananvongur**



Skøruspannari *Xanthorhoe decoloraria*. *Mynd: Mogens Frost Christensen*

***Ávísingarlisti til bókmentirnar:***

Dahl, Leif, 1956: Firvaldar, Føroya náttúra – Føroya skúli, Tórshavn.

Karsholt, O. and Razowski, J. 1996. The Lepidoptera of Europe. A distributional checklist, Apollo Books, Stenstrup, Denmark.

Kaaber, Svend, June 1995: A List of the Lepidoptera of the Faroes. Shetland Entomological Group Newsletter.

Ólafsson, Erling, 1991: Íslenskt skordýrtal, Fjölrit Náttúrufræðistofnunar 17.

Ólafsson, Erling & Hálfdán Björnsson 1997: Fiðrildi á Íslandi 1995. – Fjölrit Náttúrufræðistofnunar 32. 136 bls. (Lepidoptera in Iceland 1995)

Skinner, Bernard, 1984: Colour Identification Guide to Moths of the British Isles. 267 pp. Viking.

Skou, Peder, 1991: Nordens Ugler. Danmarks Dyreliv 5: 566 pp. Apollo Books, Stenstrup.

Palm, Eivind, 1986: Nordeuropas Pyralider. Danmarks Dyreliv 3: 287 pp. København.

*Mortansmessa 1998*

# Lundafráboðanir í 1998

**við Jens-Kjeld Jensen, fuglaútstappara, Nólsoy**

Pisa merkt t. 15.8.1993 í Hattarvík. Fleygað t. 15.7.1996 í Urðini á Eystfelli, Hattarvík.

Pisa merkt t. 6.8.1994 í Hattarvík. Fleygað t. 25.6.1998 í Hattarvík.

Pisa merkt t. 6.8.1994 í Hattarvík. Fleygað t. 25.6.1998 í Hattarvík. Jú, tvinnir lundar merktir samstundis á sama stað, og fleygaðir 4 ár seinni samstundis á sama stað er rætt.

Pisa merkt t. 6.8. 1994 í Hattarvík. Fleygað t. 24.7.1998 í Múlabakkanum, Hattarvík.

Pisa merkt t. 6.8.1994 í Hattarvík. Fleygað t. 27.6.1998 í i Seyðtorvu.

Pisa merkt t. 6.8.1994 í Hattarvík. Fleygað t. 7.8.1998 í Múlabakkanum, Hattarvík.

Pisa merkt t. 15.8.1995 i Hattarvík. Fleygað t. 4.7.1998 í Hattarvík.

Pisa merkt t. 15.8.1995 í Hattarvík. Fleygað t. 17.7.1998 í Hattarvík.

Pisa merkt t. 15.8.1995 í Hattarvík. Fleygað t. 24.7.98 í Múlabakkanum, Hattarvík.

Pisa merkt t. 25.7.1994 í Seyðtorvu. Fleygað t. 23.6.1998 í Seyðtorvu.

Pisa merkt t. 25.7.1994 í Seyðtorvu. Fleygað t. 27.6.1998 í Seyðtorvu.
Pisa merkt t. 7.8.1995 í Skúvoy. Fleygað t. 29.7.1998 í Nólsoy.

Pisa merkt t. 7.8.1995 í Skúvoy. Fleygað t. 7.8.1998 í Hestoy.

Pisa merkt t. 19.8.1995 í Borðtorvu, Bø. Eftirkannað t. 24.7.1998 í Mykinesi.
Pisa merkt t. 8.6.1994 í Kollaurðini, Tindhólmur. Drigin umleið tann 15.6.1997 í Tindhólmi.

Gamal lundi merktur t. 3.8.1990 í Tindhólmi. Fleygaður t. 20.7.1998 í Mykinesi.

Gamal lundi merktur t. 2.7.1992 í Mykinesi. Fleygaður umleið15.7.-1995 í Mykinesi.

Gamal lundi merktur t. 25.8.1992 í Mykinesi. Fleygaður t. 21.7.1998 í Mykinesi.

Gamal lundi merktur t. 24.8.1992 í Mykines. Fleygaður t. 17.7.1998 í Mykinesi.

Gamal lundi merktur t. 19.8.1992 í Mykinesi. Fleygaður t. 15.7. 1998 í Mykinesi.

Pisa merkt t. 19.8.1994 í Mykinesi. Fleygað t. 5.8.1998 í Mykinesi.

Pisa merkt t. 19.8.1994 í Mykinesi. Fleygað t. 3.7.1998 í Mykinesi.

Pisa merkt t. 19.8.1994 í Mykinesi. Fleygað t. 16.7.1998 í Mykinesi.

Pisa merkt t. 14.8.1995 í Mykinesi. Fráboðað t. 11.7.1998 úr Mykinesi.

Pisa merkt t. 12.8.1996 í Mykinesi. Fleygað t. 24.7.1998 í Mykinesi.



Sildberi. *Mynd: Thomas Grüner*

Gamal lundi merktur t. 19.8.1996 í Stórhöfði, Vestmannaeyjar. Fleygaður t. 20.7.1997 í Lamba í Mykinesi.

Gamal lundi merktur t. 16.6.1996 á Sule Skerry. Fleygaður t. 22.7.1998 í Nólsoy.

Tá tosað verður um heimføðingar, hugsi eg vanliga sjáldan um fugl, men tá eg skrivaði hesa greinina um fráboðaðan lunda, rann mær í hug hetta eyknevni, sum so sera væl hóskar til teir 22 av lundunum í hesi greinini. Bert ein av teimum 9 lundapisunum, ið vóru merktar í Hattarvík, var fleygað á eini aðrari oyggj – í Seyðtorvu, ið sum kunnugt liggur næst Fugloynni.

Skúvoyarlundin er heldur lættari á flognum, men fer helst ikki langt frá hvar hann er klaktur. Eingin ringmerktur lundi er fráboðaður úr Skúvoy í summar.

Tað sigur seg sjálvt, at fleygamenninir hava eina sera stóra ábyrgd, tá tað ræður um at røkja lundalandið. Verður meira fleygað enn »teirra« lundastovnur kann bera, minkar lundastovnurin samsvarandi, so her hava fleygamenninir eina stóra ábyrgd. Her ber ikki til at siga sum fiskimaðurin – at fiskur hevur stert, og hann kann svimja úr einum øki í annað, tí hóast lundin sum kunnugt hevur tvinnar veingir at flúgva við, merkir tað ikki, at hann flytur millum stovnarnar ella bølini. Fráboðaninar vísa greitt, at hvør lundi, ið verður fleygaður, hoyrir til tað staðið ella tann lundastovnin, hvar fleygamaðurin situr við stongini. So um tað til dømis nú gongst illa við lundapisunum í Mykinesi, ber ikki til framhaldandi at sita og fleyga ár aftan á ár úti í Mikinesi, og so koma við tí grundgevingini, at fleygað verður eitt nú av yvirskotinum í Hattarvík, tí hóast tann stovnurin kann verða ivaleysa stórur, so flýgur lundin úr Hattarvík ikki til Mykinesar mitt í verpingartíðini fyri at verða fleygaður!

Í Mykinesi var tað soleiðis í ár, at helmingurin av teimum fleygaðu ringmerktu lundunum var gamal verpingarfuglur, hvørs pisa helst frammanundan hevur verið deyð í hungri.

Fráboðaninar úr Mykinesi prógva tíverri eisini greitt, at so hvørt sum lundapisan doyr, ja so byrjar foreldrafuglurin at flúgva í lundaringinum saman við teimum ungu fleygalundunum. Á henda hátt verður verpingarlundin fleygaður saman við teimum ungu lundunum, uttan at nakar leggur tað til merkis. Hvaðna minni hevur nakar ábyrgd av tí. Hetta er ein sera óheppin ringrás, ið kann endurtaka seg ár undan ári, alt eftir hvussu pisan kemur undan, og kann enda við einari javnari stovnsminking, ið eingin varnast, áðrenn heilt galið stendur til.

Vit vita øll, at skeivt er at veiða av nøkrum, har stovnurin ikki megnar at seta nýtt við, og tá talan er um lundan, ið sum kunnugt verður fleygaður kring alt landið, eiga vit at gera okkurt beinanvegin, ella má lundin heildarfriðast alla staðni áðrenn vit vita av, vegna eina fúkandi niðurgongd í stovninum.

Ikki tí – eingin munur er á fugli og seyði. Verður lambið dripið saman við ærini á heysti, so minkar seyðatalið sjálvandi samsvarandi. Men, eingin vildi verið so býttur at dripið bæði lamb og móðir og so samstundis tosa um, hvussu skurðurin man fara at hilnast komandi árið – ella hvussu?

Vit mugu halda aftur við at fleyga, tey árini tá pisan ikki kemur undan, og annars geva henni størri ans. Og øll fleyging eigur at enda í seinasta lagið 7. august á hvørjum ári, tí tá er pisan vanliga floygd, og tá byrjar so foreldrafuglurin at flúgva í lundaringinum saman við teimum 3-4 ára gomlu lundunum. Um øll fleyging endar seinast 7. august, verður verpingarlundin vardur. Tey fólk, sum duga sær hógv og hava ábyrgd av lundalandinum kring landið, hava sjálvandi ein góðan møguleika at verja um lundastovnin bert við at nýta »Grannastevnulógina«, tí sjálvandi skal lundastovnurin røkjast og gagnnýtast.

*Jens-Kjeld Jensen*

# Helsareyði og Bringureyði

**Ein 76 ára gomul feiltulking**

Tann 18. mars 1998 hevði eg eina grein í Dimmalætting, hvar eg skrivaði um bringureyða. Fleiri fólk ringdu til mín og greiddu frá, at tey høvdu sæð bringureyða í stórkavanum í byrjanini av mars, og sostatt er greitt, at onkur bringureyði hevur verið at sæð kring landið síðsta vetur. Men tað, sum gjørdi meg ikki sørt bilsnan var, at umleið helmingurin av teimum ið ringdu, kallaðu fuglin bringureyða, meðan hin helmingurin søgdu hann eita helsareyða! Ein ið ringdi, segði hann enntá eita robin, ið er tað enska navnið á fuglinum. Latið okkum tí hyggja at, hvussu bringureyði eitur í grannalondum okkara, og her greiða frá, hvussu útsjónd hansara er:

Bringureyði eitur rødkælk og rødhals á donskum, robin á enskum, rødstrupe á norskum og rødhake á svenskum máli (gamla svenska navnið var Rödbröst).

Bringureyði hoyrir til spurvafamiljuna, og er umleið 14 cm. til longdar. Hann er grábrúnur á liti á bakinum og rustreyður á hálsinum, og á bringuni. Hann etur flogkykt og fræ, og sæst ofta nær húsum, har fólk geva fuglunum at eta.

Helsareyði. Longu í »Færøernes Fuglefauna« í 1862 skrivaði Müller sýslumaður um Helsareji, meðan føroyska navnið bringureyði ikki finst í bókini, hóast fuglurin er umrøddur við latínskum heiti.



Bringureyði. *Mynd: Marita Gulklett*

Á donskum eitur hann odinshane, á enskum red-necked Phalarope, á norskum svømmesnipe og á svenskum Smalnäppad Simsnäppa. Mikkjal á Ryggi kallar fuglin ávikavíst helsareyði og so »polladunna«, sum helst er navn, ið stavar har vestri frá. Nólsoyingar kalla fuglin »sildahøna«.

Helsareyði er umleið 18 cm. til longdar og líkist ikki sørt einum grælingi. Hann hevur eitt beint tunt nev. Ryggurin á honum er skjórutur og dimmgráur á liti við gulbrúnum strikum á bakinum. Búkurin er ljósur, nærum hvítur. Hálsurin er reyðbrúnur á liti. Á tærnum hevur hann breið bløð, so hann líkist einum hálvum fitjufugli. Hann er góður svimjari, og verpur kring alt landið við smá vøtn.

Eins og myndirnar sýna og teksturin sigur, so líkjast hesir báðir fuglarnir als ikki. Nøvnini kunnu tó møguliga gera fólk í ørviti.

Í 1921 gav Jacob Dahl próstur út »Halgisøgur«. Har kundi ein lesa tað hugvekjandi góðu søguna »Helsareyði«, sum hann hevði týtt úr svensku søguni »Fågel Rödhake« eftir rithøvundanum Selmu Lagerløf. At ein feiltulking her er komin fyri, er heilt víst. Møguliga kendi Jacob Dahl hvørki helsareyða ella bringureyða, og óvist er enntá, um navnið bringureyði fanst tá.

Selma Lagerløf hevði heilt víst fuglin bringureyðan í huganum, tá hon skrivaði søguna um henda lítla fuglin, ið fekk bringuna litaða reyða av einum blóðdropa, sum hann fekk á seg, í tí hann hálaði eina torn úr andlitinum hjá Jesusi, ið kom berandi krossin við tornakrúnu á høvdinum.

Hvørji jól siti eg og mong onnur og hoyra hesa framúrskarandi góðu søguna, og fá munnu tey verða, ið ikki kenna hana. Tá tað nú er greitt, at helmingurin av føroyingum kalla bringureyða fyri bringureyða, meðan hin helmingurin kallar bringureyða fyri helsareyða – uttan at kenna fuglin, ið eitur helsareyði, skjóti eg upp, at bæði nøvnini verða nýtt til bringureyðan, meðan helsareyði so antin fær navnið sildahøna ella polladunna. Hvat heldur lesarin?

*Jens-Kjeld Jensen*



Helsareyði. *Mynd: Willy Mardal*

# Fuglar sæddir í Føroyum

**1998**

Toppont *Mergusserrator* 13. jan. 1998 trí pør í Kaldbaksbotni P. M. Øgvella *Clangula hyemalis* 17. jan. 1998 ein steggi, er sæddur fleiri ferðir sama stað í Kaldbaksbotni P. M. E. M. 26. juli 1998 ein fuglur fjaðursárur P. M.

Mánadúgva *Columba palumbus* 20. jan. 1998 ein innan Glyvur N. T. 29. juni 1998 ein úti á Bø Kirkjubø. P. M. E.M.

Íslandsgás *Anser brachyrhynchus* 25. jan. 1998 ein í Fossdali. Síggjast av og á saman við grágásum og kunnu parast við teimum, men tað kemur sjáldan nakað burturúr. P. M. E. M.

Øshvít gás *Branta canadensis* mars 1998, 16 vóru í fjøruni í Fuglafirði D. R.

Tangspógvi *Numenius arquata* 6. mars 1998 vóru 100 at síggja í Tjaldavík. J. W. 15. sept. 1998 ein flúgvandi oman skúlan í Hoyvík. H. O. 28. nov. 1998 ein sunnan fyri Hvalvík. P. M. E. M. 29. nov. 1998 tveir á Velbastað. P. M. E. M.

Fjallaígda *Fringilla montifringilla* fráboða 7. mars 1998 ein á Skála M. B. ein í Tórshavn G.R.

Bringureyði *Erithacus rubecula* fráboða 7. mars 1998 ein í Norðagøtu A. H. tveir í Klaksvík E. J.

Línígda *Carduelis cannabina* 19. apríl 1998 ein funnin deyð í Funningsfirði. A. J.

Vípa *Vanellus vanellus* 4. apríl 1998 ein í Norðadali. P. M. E. M.

Brimont *Histrionicus histrionicus* 5. apríl 1998 ein steggi í Kirkjubø. Hetta er helst tann sami, ið hevur verið her í fleiri ár. 3. mai 1998 tvær bøgur, tað er helst fyrstu ferð tær eru sæddar og skrásettar í Føroyum. P. M. E. M. 11. okt. 1998 eitt par Kirkjubø. P. M.

Erla kongsdóttur *Motacilla alba* 20. mai 1998 ein í Kirkjubø. P. M.

Álka *Alka torda* 21. mai 1998 tvær í Kaldbaksbotni P. M. E. M.

Imbrimi (Havgás) *Gavia immer* 31. mai 1998 ein í Hestfirði og ein ungfuglur í Kirkjubø 20. des. 1998 ein í Funningsfirði. P. M. E. M.

Lómur *Gavia stellata* 29. juni 1998 eitt par við tveimum ungum. Annars hava fleiri pør við ungum verið at sæð á vøtnum og tjørnum um alt landi; eini 15-20 pør. P. M. E. M.

Herfuglur (Upupa epops) 27. sept. 1998 ein í Runavík. H.L.

Fiskiørn (gjóður) *Pandion haliaetos* 6. okt. 1998 ein í haganum á Eiði við Gráfelli. S. í. K. Ein fiskiørn hevur annars veri at síggja í Kaldbaksbotni og Skálafyrði.

Stelkur *Tringa totanus* 28. nov. 1998 ein á Hvalvíksoyruni. P. M. E. M.

Hegri *Ardea cinerea* 27. des. 1998 tríggir í Kaldbaksbotni. P. M. E. M.

Teisti *Cepphus grylle* tveir ungfuglar í Kaldbaksbotni P. M. E. M.

Husrødstjert *Phoenicurus ochruros* 3. des. 1998 ein í Nólsoy. A. J. P. J.

***Navnalisti:***

A. H. = Anna Hansen
J. W. = Jógvan Weihe
A. J. = Aksel Joensen
M. B. = Maria Bech
Á. J. = Áslak Johannessen
N. T. = Niels Thomsen
D. R. = Ditlev Róin
P. M. = Petur Mortensen
E. J. = Elsa Johannessen
P. J. = Petra Joensen
E. M. = Erik Mortensen
S. í. K. = Suni í Kollsbyrgi
G. R. = Gunnbjørg Rubeksen
H. L. = Hjalmar Lamhauge
H. O. = Heri Olsen

*Petur Mortensen*



Øshvítar gæs, myndin er tikin í fjøruni í Fuglafirði, mars 1997. *Mynd: Ditlev Róin*

# Túrur út á Borðina

**28.-29. juni 1997**

Farið var av havnini um miðdagsleiti, vit vóru 14 fólk sum høvdu glett okkum til henda túr.

Umborð komin sessaðust øll afturi á lastalúkuni umborð á strandfaraskipinum Rituni. Her var proviantur býttur út til hvønn einstakan at bera, nógv gott var at eta, vit skuldu jú liggja nátt.

Túrurin um Nólsoyarfjørð var góður og komu vit at landi í Nólsoy hálvan tíma eftir fráferð av Bursatanga. Síðani var farið til gongu, leiðin gekk niðan brekku, – niðan á kúluna – síðan var gingið eftir sløttum restina av túrinum, ein sera vøkur náttúra.

Tá vit nærkast Borðuni merkja vit miklan svidnaroyk og vóru vit forvitin at vita hvat hetta mundi vera, og við eitt varð gátan loyst. Menn høvdu verið á fjalli til ullaroyting, og var hetta ullin, ið her lá og brendi – ja hetta var Føroya gull?, vit hildu so áfram tí nú var stutt eftir á Borðuna, og spenningurin vaks fyri hvørt fet, fyri at vita hvussu har var. Vit skuldu jú sova her eina nátt sum fyrr skrivað, og tað má eg siga at tað var yvir allar »forvantningar« tað ið vit nú sóu.

Tá vit nærkaðust líktist hetta einum stórum bóndagarði, men tá tú so kemur á staði sær tú skjótt at tað eru tey gomlu vitapassarahúsini, vøkur á at líta har tey standa og líta út á tað stóra hav.

Um tey kundi tosað, høvdu tey nokk greitt frá onkrari spennandi hending, men tíverri vit máttu bert ímynda okkum hvat hesi hava verið vitni til.

Síðani var farið innar, og tað, ið ikki hevði verið, tað bleiv tá. Vit sóu eini sera, sera væl hildin, væl frá farin og snotulig hús. Ja, mín meining er tann, at tey fólk, í búleikast hava her, og vóru noydd at fara, eiga heiðurstekin uppiborið, tí tað, ið vit sóu, kann ikki greiðast frá í orðum, nei tað má upplivast.

Síðani var fingið greitt hvar hvør skuldi sova, og fingu vit eitt verilsi í part, ja sum á hotelli. Síðani var farið út at spáka í hesi vøkru náttúru. Ja har er sera vakurt, og ringt er at skilja nú, at man ígjøgnum alt sítt lív hevur sæð út á Borðuna og ímynda sær, at alt er bert ein long strika, og so nú at vekja minnir frá góða túrinum vit vóru har, tað er óskiljandi.

Eftir at hava gingið ein túr út á endan á Borðuni, har tann gamli vitin stendur, og sæð tað ríka fuglalív, fóru vit aftur til húsar, har døgurin stó klárur, tað høvdu tær røsku damurnar syrgt fyri, og væl smakkaði, jú eitt satt greivalív.

Eftir at hava etið henda góða mat, var prátað um tað vit høvdu sæð, onkur fór at fáa sær ein lúr, meðan onnur fóru enn ein túr. Tá klokkan var farin um midnátt, var farið til songar.

Vit vóru tíðliga uppi morgunin eftir, fingu okkum morgumat, og síðani var farið at rudda upp, so alt var í sama standi sum tá vit komu, og nú var klokkan vorin so nógv, at vit tóku ryggsekkirnar á herarnar, fyri síðani at ganga aftur til Nólsoyar bygd. Komin til bygdina fóru vit øll inn á matstovuna har vit fingu ein vælforkentan drekkamunn, meðan vit bíðaðu eftir Rituni.

Samanumtikið ein sera góður túrur og takk fái tey sum góðu okkum møguleikan at gista úti á Borðuni í einum væl viðfarnum og góðum húsum.

*Bjarni Dalsgarð*



Vit standa øll uttanfyri vitapassarahúsini klár til heimferð. *Mynd: Petur Mortensen*

# Minnir

Míni fyrstu fjúrtan ár vaks eg upp í Gjógvarátúni í Fuglafirði. Í 1943, undir krígnum, fór eg í skúla. Sum hjá so nógvum, vóru hesi fyrstu ár merkt av vandasigling og óvissu. Við krígslok í 1945 kom gerandisdagur inn aftur í fasta legu, har árstíðirnar og slupptíðin myndaðu árið. Um várið fór pápin á Suðurlandið. Heimafturkomin, áðrenn Eysturlandstúrin, varð torvið skorið, og nøkur epli sett niður. Tíðin var knøpp, og skjótt skuldi ymiskt fáast frá hondini. Tað, sum eg best minnist, var at sleppa einsamallur við pápa út á Kambsdal, har hann við sveittabroti stóð í torvheygunum; og við sínum pinnagrevi lagaði tær svørtu torvurnar.

Kambsdalur er vakur og víður dalur. Nú er vakrasta lendið bygt, men tá var dalurin byrjanin til summarið. Heiðafuglurin var komin, og hugaligt var einsamallur at reika runt í dalinum og niðan móti Mýrubotni at leita eftir reiðrum. Men skjótt skuldi pápin aftur í hav; men steðgur kom ikki í, tí torvheiðar høvdu vit saman við Hannufastur og Andreas í Tøvuni. Sum leið á summarið, kundi verað møtismikið at bíða eftir torvterra og fáa torvið til høldar í gamla gróthúsið hjá okkum. Tá vóru nógv, ung og gomul, í torvi, og nógvar vóru hugnaløturnar og fríløturnar, har vit ungu spældu saman. Fyrst í fimtiárinum gekk eg í skúla í Havn. Torvterrin hevði ikki verið av tí besta, og ikki fyrr enn á Ólavsøku bóru vit torvið saman. Á Kambsdali var hugni og ríkar løtur.

Um ólavsøkuna byrjaði hoyggingin. Umframt leigugerði, høvdu tey trý húskini, hjá Hannufastur, hjá Meinhard pápabeiggja og hjá okkum, eisini kúgv saman. Meinhard var eisini sjómaður, so Andreas og eg høvdu yvirhøvur slátturin um hendi, meðan øll trý húskini vóru saman um hoyggingina.

Men nú verður hetta lítla brotið skrivað til ritið hjá Fuglafrøðifelagnum. Ein partur av sumrinum, sum eg minnist við serligari gleði, var tá ið pápin kom aftur Eysturlandstúrin, og summarið og smáfuglarnir vóru komin. Tá kundi hann taka í hondina á mær, og vit fóru leiðandi niðan brekkuna gjógnum gerið hjá Gøtu Ólajákup móti fyrsta hamri undir Nón, har hann sum 12 ára gamal hevði gjørt eina steinstólpuholu. Innast yvir holuna var takt við flatum steini. Varliga kundi hesin lyftast, og vit kundu telja eggini og onkuntíð eisini ungarnar. Varisliga skuldi alt fara fram, tí ikki mátti steinstólpuparið órógvast meira enn neyðugt. Síðani hildu vit leiðina fram undir hamrinum Vestur í Dal, har hamarin fánar burtur. Har, í einum bletti við vøkrum útsýni yvir bygdina og móti Jøklaskarði, hevði hann eisini av eintingum gjørt steinstólpuholu.

Ofta havi eg hugsað um, at ganga somu leið og leita; men meira enn hálvthundrað ár eru farin, og helst eru holurnar máðaðar burtur av veðrið og smáum skriðum. – Best man vera at varveita tær í minninum.

*Sólbjørn Jacobsen*



Steinstólpa *Oenanthe oenanthe.* *Mynd: Lademanns naturfører. Fugle-atlas.*

# Tjøldrini og lesullin

So kom tann stundin, tá ið eini túsund tjøldur verða pínd til deyðis, bert stutta tíð aftaná móttøkuna av tjóðfugli okkara á Grækarismessu. Alt til sína tíð. So er. Ongin áhugi er fyri tjaldrinum. Fjølmiðlarnir taka tað nóg illa upp á tunguna. Undantikið er tó Dimmalætting, sum skal hava takk fyri tað, hon hevur gjørt, og Tórur Mikkelsen við sínari sending í sjónvarpinum. Annars letur tjóðin, øll sum hon er, eyguni aftur, hettar er jú eyðkenni fyri okkum føroyingar.

Men hvat sigur gesturin, sum kemur til okkara at vitja? Tað kann ikki verða leingi, til útheimurin vendir eyguni móti hesum klettum, og hugsar hetta paradoksala við føroyingum; tað at tosa við tveimum tungum. Hugaligt var at síggja sjónvarpssendingina, har kendur polittikari gekk úti á trøð sínari. Hann frøddist um tjaldursparið, sum vitjaði hann við trimum ungum. Ja munur er á.

Hugsi um allar tær traðir kring landið. Har ganga ólukkudýr og halta. Tey orka ikki at halda sær uppi, sita fyri tað mesta. Og eigarin, sjálvt um hann býr á staðnum ella nær við, hugsar ikki um, at tað er hann, beinleiðis ella óbeinleiðis, sum er atvoldin til tað støðu, tjaldrið er komið í. Við lítlum stríði, um hann hevur eitt sindur av vilja, kundi hann í hvussu er minkað um vandan. Tað hevði í sjálvum sær verið ein løn, sum samstundis fylti hann við gleði og nøgdsemi. Nei tvætl, hvat er eitt tjaldur vert. Er tað ikki bæði ókristuligt og óguduligt, ikki at hava so mikið av kenslum her í lívinum?

Sum gongdin er nú, so kann tað bara ganga ein veg hjá tjaldrinum, og tað er niðureftir. Lítið og onki kemur undan í stórum parti av landinum. Ein rúgva av tjøldrum doyggja av lesull. Og sum hugburðurin er hjá fólki, trúgvi eg ikki nógv leggja lag í tað.

Haldi, at vit skula avtaka alt sum eitur Grækarismessuhald í framtíðini, tí at tosa um nakað, og ikki meina tað, tænir ongum endamáli.

*Erik Mortenenn*



Hugsi um allar tær traðir kring landið. Har ganga ólukkudýr og halta. Tey orka ikki at halda sær uppi, sita fyri tað mesta. Og eigarin, sjálvt um hann býr á staðnum ella nær við, hugsar ikki um, at tað er hann, beinleiðis ella óbeinleiðis, sum er atvoldin til tað støðu. tjaldrið er komið í.

*Mynd: Lív Dam*

# Øll tosa um veðrið, og onkur ger eisini okkurt við tað

## Nøkur tøl um føroyska veðurlagið

Øll tosa um veðrið, men ongin ger nakað við tað, segði Storm P á sinni. Og helst er ein lítil sannleiki goymdur í hesum vísdómsorðum. Veðrið skikkar sær sjálvdan so sum vit kundu hugsa okkum tað. Veðrið er, sum oftast keðiligt, tað halda vit, í hvussu er. Ofta er regn og vindur, men tað hendir tó, at tað er ov heitt og um sumrarnar hoyra vit ofta útvarpið heita á fólk um at spara uppá vatnið, meðan turkur er. Nei, eitt er vist, tað er ikki lætt at vera Várharra. Men fyrr var veðrið nógv betri, tað siga í hvussu so er øll gomul fólk. Men er hettar nú eisini soleiðis? Lat okkum kanna hendan spurningin eitt sindur nærri. Í 1998 gav Danmarks Metreologisk Institut út eina frágreiðing um føroyska veðurlagið: »The Climate of The Faroe Islands – with Climatological Standard Normals, 1961-1990«. Hettar er ein frágreiðing uppá góðar 50 síður, sum við turrisligum tølum greiður okkum frá føroyska veðurlagnum.

Her kunnu vit lesa, at tað regnar mest í Hvalvík. Har regnar í miðal 3.261 mm um árið. Tríhundrað dagar um ári regnar tað meira enn 0,1 mm um dagin, 243 dagar á hvørjum ári fáa hvalvíkingarnir meira enn 1 mm av regni yvir sín kropp og 104 dagar um árið regnar tað meira enn 10 mm. Í harðari kapping við Hvalvík eru Hellurnar; har regnar tað 3.242 mm um árið. Minst regnar tað í Mykinesi; 823 mm árliga. Í Havn regnar tað í miðal 1284 mm um árið. Annars hevur Klaksvíkin verið løgd undir, at vera tað staðið í landinum, har fólk skulu leita sær, um tey sakna regn. Men, sambært frágreiðingini, so regnar tað bert 2.334 mm árliga við Fossáverkið, so hendan ivasama heiður hava klaksvíkskingar av órøttum havt í nógv ár.

Í frágreiðingini kunna vit lesa, at vanligasta ættin í Føroyum er útsynningur. Í Akrabyrgi er ættin útsynningur í 20% av tíðini, meðan talið fyri Havnina er 15%. Sjálvsamasta ættin í Havnini er eysturætt, einans 4,2%. Í Mykinesi er ættin landsynningur 18% av tíðini, 16% er hann norðan og 13% útsynningur. Vit fáa eisini at vita, at í Akrabyrgi eru 187 dagar um árið, har vindurin er meira enn 11 m/s, 19 dagar meira enn 21 m/s, 7,3 dagar meira enn 26 m/s meðan tað í miðal eru 2,2 dagar um árið, at vindurin er meira enn 31 m/s.

Í Havnini eru í miðal 44 kavadagar um árið. Frágreiðingin fær helst handilsmennirnar, sum selja heit klæðir, at semjast um, at í Føroyum er gott at vera. Árligi miðalhitin fyri Havnina er 6,5 $^0$C. Í januar-februar er hitin í miðal 3,5 $^0$C, meðan hann í juli-august er 10,5 $^0$C. Heitasta staðið í Føroyum er á Sandi, har er miðalhitin fyri árið 7,0 $^0$C. Mesti hitin, sum er mátaður á teimum føroysku veðurstøðunum er 24 $^0$C. Hendan rekordin var mátað á miðdegi 30. juli 1980 á Flogvøllinum í Vágum. Her er eisini tann kaldasta mátingin gjørd -11,7 $^0$C. Tað var tíðliga á morgnið 7. februar 1969. Fægstu frostdagarnir eru á Kirkju; í miðal 36 dagar um árið. Tað staðið í landinum har tær longu ullintu undirbuksurnar koma best til sín rætt, er á flogvøllinum í Vágum. Har frystir tað í miðal 62 dagar um árið. Her er eisini kaldast; 6,0 $^0$C í miðal fyri árið.

Í Havn eru 40 mjørkadagar árliga. Hóast flestu havnafólk ilskast inn á tann nógva mjørkan, sum hevur fjalt summarsólina hesi seinastu árini, eru tað í miðal einans góðir 7 summardagar um mánaðan, at sýnið hevur verið stytri enn 1 km. Í Havnini er yvirskíggjað 221 dagar um árið. Í miðal uppliva havnafólk bert 1,9 dag (ein komma níggju dag) um árið, tá skýggini fjala minni enn 80% av himmalinum. Eitt sindur frægari stendur til í Akrabergi; har er “bert” yvirskíggja í 199 dagar um árið, men so sleppa tey eisini bert at njóta 1,7 dag hvørt ár, har himmalin er skýfríður. Í Havnini er brennandi sólskinn í miðal 840 tímar (35 døgn) um árið. Sólin skínur mest í mai og juni, tá eru 125 sóltímar hvønn mánað (tað er einans 5,2 døgn). Fólkini, sum gingu í havnargøtum tann 3. juni 1971 kunna prísa seg lukkkuligan. Hettar var ein serligur dagur, tí sambært hagtølunum, er tað eingin mannakroppur í Føroyum, sum hevur fingið so nógva sól á seg í ein dag. Hendan dagin skein sólin 16,5 tímar. Einki hoyrdist tó um yvirdosis. Minst skínur sólin í desember, hendan mánaðan fáa havnafólk bert 7,0 tímar við brennandi sól.

Men teir árligu sóltímarnir eru blivnir færri. Árini 1922-1930 vóru í miðal 967 tímar árliga við brennandi sól. Árini 1991 til 1997 vóru sóltímarnir minkaðir við 6 døgnum, til 821 sóltímar um árið.

Jú, kanska var veðrið betri fyrr.

Tey ið kundu hugsa sær at vita meira um føroyska veðurlagið, kunnu fáa fatur á frágreiðingini á internetinum undir adressuni:

http://www.dmi.dk/

*Eyðfinn Magnussen*

# Á ferð í Hattarvík

**Vikuskifti 13.-15. juni 1997**

Árligu ferðir felagsins hava misjavna lagnu, flestu ganga eftir ætlan, aðrar verða avlýstar av ymsum orsøkum, fráfall vegna sjúku, merkisdagar, burturveru o.m.a.

Henda ferðin var lýst á fyrsta sinni í 1995, tvinni vikuskifti; men vegna sera vánalig líkindi avlýst. Kom ikki á skránni í 1996, men ábyrgdarfólk hættaðu sær aftur í 1997 at lýsa hesa áhugaverdu ferð.

Allar árar vóru lagdar í sjó at fáa eitt so væleydnað vikuskifti á árinum til endamálið, og væl var rakt. Hann lovaði landsynning við frískum vindi, minkandi fríggjadagin og skuldi hann tá ganga úr útsynningi upp í útnyrðing norðan.

Fríggjamorgunin var ikki lendandi á Eiðinum í Svínoy, og enn minni í Fugloy. Høvdu tó heldur ikki hug at avlýsa; men mettu, at veðurmaður okkara fór at halda givin lyftir. Ferðafólkini møttust tí í Hvannasundi fyri at royna eydnuna, eini tvey restaðu tó í. Manningin á Másanum segði tó, at ivasamt var, um vit sluppu í land, men teir fóru at royna.

Tey 12 fólkini, sum vóru komin norður, fóru umborð og vónaðu tað besta. Túrurin til Svínoyar var hampuliga góður, tó kendi onkur trongd til at gjara út. Eitt sindur av uppgangi var á Eiðinum, tí gjørdist spenningur, um tað eydnaðist at leggja at. Vit, sum ikki kendu til, hvussu nógv slíkir sjógarpar leggja fyri, dugdu ikki í fyrstu syftu at síggja møguleikan hjá ferðafólki og viðføri at koma upp á bryggjuna; men hóvliga og handaliga varð atborið.

Skjótt og væl gekk at fáa fólk og farm á land og mjólkatangarnar umborð aftur, meðan skiparin sigldi fram á springið.

Síðan varð kósin sett út á Kirkju, og her gjørdust lýkindini munandi verri, Másin tveitti seg á ymsar bógvar, sjóverkurin øktist, heldur enn minkaði, og tað vóru tey, sum neyvan høvdu gjørt mótstøðu, um tey fóru fyri borð.

Inn ímóti lendingini á Kirkju sá ikki væl út; men kósin var sett, og ætlanin var framd. Hesir menn vita júst, hvussu nógv teir kunnu leggja fyri, og nær vendast skal aftur. Endin varð tveittur í land, og nú var sjón fyri søgn, hvussu hesir vandu sjógarpar arbeiða í sínum dagliga verki. Hegnisliga og lagaliga, alt gekk eftir eini fastari linju, góvu út og háláðu inn á endanum. Báturin hivaði so høgt, at fyri okkum tyktist, sum hann kundi falla inn á bryggjuna, fyri seinni at fara so langt niður, at stýrhústakið lá fleiri føtur undir bryggjukantinum.

Flestu ferðafólkini vóru helst ættaði úr oynni, tey vistu akkurát, nær løgir vóru at loypa á land, so her var ongin trupulleiki. Men ásannast skal, at vit, sum komu frá deyðavatni, royndu at lúra teirra snildir, kanska komu vit í somu støðu seinni.



Fúsi omanvert Hattarvík. *Mynd: Ditlev Róin*



Hugni á Kirkju. *Mynd: Ditlev Róin*

Nú var bert seinasti partur eftir, men hvussu mundi veðrið roynast á Hattarvík, hann tyktist nú at vera rættiliga háligur. Veðrið kendist makligari, tá siglt varð eystur undir Sjúrðarbergi, og komin inn á Hattarvík, var heilt slætt.

Viðførið, sum sjálvandi ikki var heilt onki, ið kravdist á eini slíkari ferð, matur til 14 fólk í 2 dagar, soviposar, klæðir og eitthvørt til hugna, myndatól o.a., skuldi berast niðan í Kelduhúsini, sum felagið hevði leigað frá Hjørleif Waag Høgnesen úr Klaksvík, og sum skuldi verða ramman um hesa ferð okkara hetta vikuskifti á hásumri.

Hjá mongum var hetta fyrsta ferðin í Hattarvík, tí varð gjørt skjótt av, fyri at fáa sum mest burtur úr ferðini, fingu okkum ein góðan bita, viðføri lagt upp á pláss og síðan ein túr út í náttúruna. Veðrið var nú heilt hampuligt, tó eitt sindur kalt og lítið lot, gott gonguveður, fjaðkaðu niðan frá bygdini eftir landsvegnum, fram við Kellingará og niðan á Hálsin, har ein kundi njóta stórbæra útsýni í ein vestan og oman yvir hina vøkru Skarðsvíkina. Eystureftir lokkaði Eystfelli 5 av luttakarunum at royna seg, sjálvt um dagurin var farin at togna í hvørjari lykkju.

Hini spákaðu sær oman eftir, men komin oman á Másafløtu, varð gingið eftir uppdyrkingarvegnum yvir á Sand og vestur ímóti Króki. Á hesum frálíku fløtum hava menn, óiva fyri árum síðani, velt stórar víddir upp úr nýggjum, og sigast má, at her er arbeitt, tí mangar staðir eru traðirnar væl girdar við grótgørðum, ein fragd fyri gestsins eygu.

Ynskiligt hevði verið, at hesi fólk kundu fingið møguleikarnar aftur at lívbjarga sær á tryggum og góðum grundarlag á teirra oyggj.

Á veg oman aftur í bygdina bleiv gingið eftir gomlu bygdagøtuni, elligamli farvegurin ímillum Hattarvík og Kirkju. Ein hestur stóð á biti uppi undir Skarði, Sverri bóndi helt seg kenna, rópti Fúsi, sum var gamla navn hansara, og kendi hesin beinavegin fyrrverandi eigarmann sín.

Sverri seldi hestin í Kirkjubø, og í 1987 bleiv hann seldur til Hattarvíkar til Zakarias Zachariasen, bónda. Eftir hetta var hann ikki kunnaður um lagnuna hjá Fúsa, tí var sera hugaligt at hittast á ein slíkan hátt. Hesturin var nú 31 ára gamal.

Fríggjadagurin er nú runnin, og hugsað verður um hvíldina, tí tíðliga verður lagt til brots í morgin, um veðrið verður til vildar.

Ein hugnaløta við einum dussi, onkrum forkunnugum afturvið, trivið verður í ein vakran fosturlandssang, og altíð er ein góð frásøgn á lofti. Hákunnardrongur kemur á vitjan og flutt verður inn í dreymalandið.

Leygarmorgunin tíðliga fóru nøkur ein túr niðan á Kubban, onnur eftir bygdargøtuni niðan á Kross og eftir vegnum oman á



Niðan á Eystfelli. *Mynd: Ditlev Róin*

Kirkju. Skjótt mátti berast at, tí Hanus Hansen, bóndi, hevði lovað at koma við okkum niðan á Eystfelli aftaná døgurða.

Gingið varð eftir rásini út Fyri uttan Bólið, og síðan beint niðan á eggina. Ómetaliga stórbært at líta norður í bergið eystanfyri. Smátt gekk niðaneftir, tí hettar er tung gongd, og útsýnið er avbera hugtakandi, myndatólini snurraðu og goymdu løtuna.

Komin niðaná norðanvert Eysturstein, lítur tú eftir Vestursteini og gerst varðugur við, at um hesir báðir standa í eystur-vestur, stendur kirkjan ikki í somu ætt, sum flestu av gomlu kirkjum okkara, og tí fingu vit greiðu á orðadráttin í gjár, tá vit ikki vóru heilt samd við Ú. F. um vestanlotið.

Leiðin gekk norður eftir eggini, og varð støðga á Mikla Skarði, hugdu niður yvir Bispin, sum er eystasti partur av Føroyum. Viti stendur á Bispinum, onkur avmyndaði hann, men hann liggur so langt inni undir berginum, sum bæði er steyrrætt og ógvuliga høgt, at ikki er lætt at greiða hetta.

Undir antennuni, sum er rættiliga høg, sessaðust øll, ótu ein bita afturvið einum flógvum drekkamunni, meðan prátið gekk av tí besta. Hanus fekk eisini nógvar spurningar um mangt og hvat, sum heldur ikki fóru ósvaraðir framvið.

Omaneftir varð gingið ígjøgnum urðina, har greitt var frá, um lundan, sum eigur ymsa staðni. Hav Hálvdans Álvsons lá á vegnum, og tað bleiv vitja, onkur tosaði fram undir við ætlanum um at royna at lyfta havinum; men tá komið var á staðið, varð ætlanin slept, tí ein meting bleiv gjørd, har menn hildu, at tað vá í minsta lagi 1 tons.

Døgurðin bleiv etin við góðum matarhuga. Tá tú gongur slíkar langar hagaferðir og ert heilar dagar úti í Guðs fríu náttúru, tykist hvør máltíð at verða jólamatur.

Ikki bleiv støðgurin langur innanhýsis, tí hin móðreyði Fúsi uppi undir Skarði skuldi hava sína viðgerð. Frá góðum fólki fekst ein bítitong, og hvast við lær hjá bóndanum var tókt at snøgga við. Áskoðararnir, sum ikki vóru vanir við slík stórdjór, høvdu ikki serligan hug at halda beinunum uppi, meðan arbeitt varð, men tá gongd kom á, var sloppið, tí hetta var eitt satt góðvaradýr, og tú gjørdist eina barlast ríkari.

Meðan gingið varð oman aftur, beyð Sámal Jákup fólki inn til ein drekkamunn og eitt prát,

Sverri, Halden, Per og eg sjálvur takkaðu fyri. Blíðskapurin var óførur, turt kjøt úr Hattarvík hevði tú neyvan smakkað fyrr, egg undan høsnum og dunnum úr eystastu bygd í landinum, heldur ikki, og væl sodnaðist. Góða tøkk fyri.

Prátið gekk av tí besta, viðgjørd blivu nógv mál, framtíðin hjá oynni, hugskotini trutu ikki, landsins støða, fiskivinnan, Føroyar sum ferðamannaland o.m.a., nei, her var ongin leitan eftir evnum. Tíðin fór bara avstað, tað var alljóst, tá vit fjakkaðu okkum eystur í hugnaliga Kelduhúsið, men heldur ikki har vóru øll løgst.

Frálíkt veður sunnudagin, og ymsi vóru hugskotini, hvar farast skuldi. Myndir vóru tiknar av vælgjørdum úthúsum, sum fólk í bygdini hegnisliga høvdu endurbygt ella bøtt um. Hugt eftir kendum støðum frá søguni, eisini støð í



Hav Hálvdan Ulvsonar. *Mynd: Ditlev Róin*

samband við floksmenninar, sum sagt verður so væl frá í lesibókum til skúlabrúks.

Nøkur vóru, sum gingu bygdagøtuna yvir á Kirkju, hin niðasta partin kendu vit frá í gjár, og brátt vóru vit hjá Bønhússteini, tá var stutt niðan á Kyrjarheyggj. Gomlu varðarnir standa uppi, tí er lætt at finna gøtuna, sjálvt um hon helst ikki verður nýtt eins nógv og fyrr. Fitt av ternu áttu á leiðini, men sagt varð frá, at har høvdu reiðrini ofta verðið nógv tættari.

Komin niðan á Kross, var sessast. Sera vakurt útsýni í allar ættir, her kundi tú í huganum síggja fjøld av teim mentafólkum, sum ríkað hava okkara land við sínum skaldskapi, halda fund summardagar við røðum og fosturlandssangi.

Spákaðu eftir koyrivegnum oman á Kirkju, ótu ein bita við tyrlupallin, og ætlaðu at fara í kirkju, men tíverri var ikki lestur henda dag.

Nú komu fleiri av okkara luttakarum oman í bygdina, vit avgjørdu tí at ganga heimaftur eftir bygdagøtuni av Kirkju og niðan á Kross. Tá komið var oman ímóti Hattarvík, komu fólk úr kirkjuni.

Dagurin var nú so nógv liðin, at ikki gjørdist so nógv meira á hesum sinni enn at fáa døgurðan niðurum, sópa og vaska húsini, pakka útgerðina saman, takka fyri okkum og spáka oman á lendingina.

Ein frálíkur túrur, hava verið víða, men fleiri støð eru, sum hugalig høvdu verið at vitja, sum dømi, niðan á Knúk, Kerlok, niðan á oynna og oman á Skarðsvík, vónandi verður høvið til tess eina aðra ferð.



Uppi á Eystfelli. *Mynd: Ditlev Róin*

Meðan bíða varð eftir Másanum, sást fitt av lunda útfyri, nakrir skarvar sótu so friðarligir í fjøruni, onkur pulkaði sær og lavaði við veingjunum, tað tyktist, sum olja var komin at fjaðrunum, og sá tí eitt sindur viðtikin út.

Postbáturin kom nú undan, og lítla løtu seinni legði hann at lendingini. Skjótt gekk at fáa viðførið umborð, sum sjálvandi var nógv tódnað, samstundis sum veðurlagið var nógv broytt. Hann stóð við klettin. Bygdin og víkin vístu seg frá síni vakrastu síðu hesa løtuna.

Heimferðin gekk av tí besta, veðrið var frálíkt, og semja var um, at ferðin eyðnaðist væl. Prátið slitnaði ikki fyrr enn á bryggjuni í Leirvík, tá øll fóru vælnøgd hvør í sína ætt.

*Ditlev Róin*

# Amerikansk kolont

## Melanitta n. americana

Tann 14. juni 1998, tá eg saman við familju og vinfólki, var ein túr gjøgnum hagan fram við Eiðisvatni, suðuri á Vatni og síðan vestur móti tjarnunum, suðuri millum Tjarnir, varð eg varugur við tveir antarfuglar, sum fóru á flog. Teir settust aftur á vestastu tjørnini, sum er stutt frá hinari. Eg fór spakuliga móti tjørnini, meðan eg gekk, gjørdi eg kikmyndatólið klárt. Tað var ein spennandi løta, tí hesir fuglar eru rættiliga varnir og fóru teir á flog, so gjørdist einki, eingin mynd, einki prógv. Tá eg kom í »skotmál« var bara at bera skjótt at, og eg so gjørdi. Myndirnar, eg tók, eru rættiliga góðar eftir umstøðunum, og var myndatakarin rættiliga óroyndur. Seinni vísti tað seg, tá hugt varð at myndunum, at tað møguliga er eitt par av Amerikanskum kolontum *Melanitta n. americana*, men hetta er ikki heilt greitt enn. Talan kann eisini verða um blendingar *hybrid*. Avrit av kikmyndum eru send til Danmarkar og England, men haðani kundu tey ikki við vissu siga, um talan er um amerikanskar kolentur. Mynd er eisini send til Amerika, men hagani er einki svar komið aftur. Hesir fuglar liva í norður Amerika, og eru rættiliga sjáldsamir at síggja í Europa, og teir eru ongantíð sæddir ella skrásettir í Føroyum.

*Petur Mortensen*



Amerikansk kolont *Melanitta n. americana* – er ein sera styggur fuglur.

*Mynd: Petur Mortensen*

# Fuglalisti

**Listi við fuglum eg havi sæð í tíðarskeiðinum 1996 -1998**

Tá eg gangi túrar úti í náttúruni, havi eg altíð ein lítlan kikara við mær. Her er ein listi við nøkrum fuglum, sum eg havi sæð í árinum 1996 til 1998. Summir teirra eru heilt vanligir í Føroyum, meðan aðrir eru meira sjáldsamir.

**Fuglar, ið eru sæddir í økinum kring Landssjúkrahúsið**

Hegri *Ardea cinerea*: Í mars og apríl mánaða sást ein hegri flúgva á leiðini við Sandá og Nólsoyarfirði.

Reyðgrælingur (krumnæbbet ryle) *Calidris ferruginea*: Í apríl mánaða varð ein fuglur tikin av eini hvirlu og slongdur inn í ein húsavegg.

Grønígða (grønirisk) *Carduelis chloris*: Í august mánaða var ein fuglur sæddur uttanfyri maskinverkstaðið á Landssjúkrahúsinum.

Reyðskalli *Carduelis hornemanni*: Í juli mánaða var ein fuglur sæddur í garðinum við Landssjúkrahúsið.

Trindilsnípa (tredækker) *Gallinago media*: Ein fuglur sæddur í Sandágerði 20. mai 1998.

Rókur: *Corvus monedula*: Sæddur í Hoyvíkshaganum í februar mánaða 1998.

Áarsvala *Riparia riparia*: Í mai mánaða 1998 var ein fuglur at síggja við Sandá. Hann fleyg aftur og fram leitandi eftir smákyktum.

Hjaltakráka *Corvus corone corone*: Veturin 1996 og 1997 vóru heilt nógvar at síggja víða um í Havnini.

**Fuglar, ið eru sæddir í Hvalba og har umleiðir.**

Helsigás *Branta bernicla*: Eitt par átti í 1971 í Hvalba. Tveir ungar komu undan. Ungarnir vóru uml. 30 cm til støddar, tá ið teir fyrstu ferð vóru sæddir. Teir hildu til í fjørðuni í tíðarskeiðinum frá seint í mai og út í juni mánaða. Tíðanverri varð parið skotið av tveimum brøðrum úr Hvalba. Tilburðurin varð meldaður til sýslumannin. Tá báturin kom at landi, stóð løgreglan fyri honum. Tað sigst, at ein av fuglunum er útstappaður, og stendur í skúlanum í Hvalba.

Hvítstelkur *Tringa nebularia*: Ein fuglur var sæddur í Nesinum í Hvalba 31. juli 1998.

Øshvít gás *Branta canadensis*: Seks gæs svumu á Norðbergsvatninum í Hvalba frá 3. august 1998 og eitt sindur fram.

Reyðspógvi *Limosa limosa*: Eitt par var at síggja í skýmingini 4. august 1998. Næsta morgun var tað burtur.

Svarthálsa *Charadrius hiaticula*: Heilt nógvar vóru at síggja í Hvalba 5. august 1998.

Flótta svarthálsa *Charadrius alexandrinus*: Eitt par var at síggja úti á Nesinum í Hvalba 5. august 1998.

Tjaldursgrælingur *Arenaria interpres*: Heilt nógvir hildu til í Hvalba frá 31. juli 1998 og eitt sindur fram. Um sama mundi var eisini nógv at síggja av fjallamurru *Calidris alpina* og eyrgrælingi *Crocethia alba*.

*Christer Alstrøm*

# Frá aðalfundinum

## hjá Føroya Fuglafrøðifelag í Mettustovu 15. mars 1998

Undirritaða hevur í farnu árum av og á játtað at umboða Føroya Fuglafrøðifelag á kunnandi fundum hjá Ferðaráð Føroya, av tí at eg kortini var hjástødd sum umboð fyri mítt táverandi arbeiðspláss, Føroya Jarðarráð. Samstundis eri eg ferðaleiðari, og havi annars eisini ein almennan áhuga í verju og varðveiting av náttúruni – hetta seinasta fellur væl saman við áhugamálum Fuglafrøðifelagsins.

Í 1997-98 vóru tveir áhugaverdir fundir, og skal eg her – eftir áheitan – greiða frá tí, sum var áhugavert, sæð úr felagsins sjónarhornið, eins og trivið verður í annað, sum undirritaða sjálv førdi fram á aðalfundinum í Mettustovu.

**Umboðsráðsfundurin**
**12. desember 1997**

Høvuðsevnið á hesum fundinum var: Hvat skal gerast innan ferðavinnuna 1998? Fundarluttakararnir vórðu skipaðir í bólkar, sum hvør sær skuldu royna at finna fram til, hvørjar týdningarmiklar tættir, meira átti at verið gjørt við. M.a. vístu bólkarnir á, at Ferðaráðið eigur:

• at menna samstarvið millum ferðavinnuna og ymsar áhugafelagsskapir

• at hjálpa til at fáa ein myndugleika, ið tekur sær av fugla-, plantu- og djóralívi, forngripum og mentan, tí hesi kunnu lættliga koma í vanda orsakað av misbrúki, ovtroyting og tílíkum – ikki minst í ferðavinnusamanhangi.

Hetta eru nýggir tónar á slíkum fundum, og tað er at gleðast um! Vónandi eru hetta orð, sum vera at síggja í verki um ikki so langa tíð – og eg meti, at Fuglafrøðifelagið eigur at fylgja við og royna at skunda undir gongdina. Úrslitið av bólkaarbeiðinum varð skrásett sum uppgávur, ið vórðu býttar út til ymsar persónar á Ferðaráðnum. Vernd kom undir Anniku Joensen, stjóra.

Persónliga hevur mær ikki dámt, at tann ógvusliga marknaðarføringin av Føroyum uttanlands í fleiri ár hevur verið tikin fram sum tað áhugaverdasta arbeiðsúrslitið hjá Ferðaráðnum, samstundis sum lítil og eingin áhugi hevur verið fyri sjálvum innanlandsviðurskiftunum. Her hugsi eg ikki um ferðavinnufasilitetirnar innanlands, men um:

• manglandi javnvágina millum ætlaðu, øktu nýtsluna av náttúrutilfeinginum í ferðavinnusamanhangi og áhugan fyri verju av hesum dýrabara tilfeingi, sum í veruleikanum er grundarlagið undir ferðavinnu í Føroyum.

Náttúran *er* ressursan – eisini í ferðavinnuhøpi, og lata vit bara standa til, kann skjótt nógv vera mist. Í øðrum londum verður arbeitt fyribyrgjandi í so máta, og nú er at fegnast um, at ábyrgdarfólk á Ferðaráði Føroya ikki longur bara yppa øksl og smílast umberandi, tá tosað hevur verið um slíka fyribyrging sum nakað týdningarmikið.

**Ferðavinnudagurin**
**6. februar 1998**

Dagurin byrjaði við áhugaverdum fyrilestri, sum Inga Gunnarsdóttir úr Íslandi helt um økologiska ferðavinnu. Í stóran mun snúði fyrilesturin seg um, at gistingarhús áttu at vanda sær um umhvørvið við at vera umhugsin, tá talan er um sápunýtslu og tílíkt. Men umframt hetta, gjørdi Inga fundarfólkunum greitt, at ferðavinna í einum landi, har størsta aktivið er ein óspilt náttúra, í stóran mun er ein spurningur um PRESERVE or DESTROY – varðveiting ella oyðing av náttúruni!

Hetta sýntist vekja ans, nú sjónarmiðið varð borið fram av einum útlendingi. Áður hevur tann hugburður valda, at ikki ov nógvar fyribyrgjandi vegleiðingar um, hvussu ein eigur at bera seg at í føroysku náttúruni, skuldu standa í prentaðum ferðavinnutilfari, tí roknað varð við, at ferðamaðurin kundi fata hetta sum vantandi gestablídni og tað fór kanska at oyðileggja »business«. Men Inga Gunnarsdóttir greiddi frá, at ferðamotivatiónin er broytt, og at fólk nú helst ferðast til lond, har varðveiting er í hásæti – og ístaðin venda hinum londunum bakið. Eisini vísti hon á, at tann mentaði ferðamaðurin anno 1998 lættliga gjøgnumskoðar hugburðin hesum viðvíkjandi í einum fremmandum landi.

Aftur henda dagin varð skipað fyri bólkaarbeiði. Tað, sum bólkarnir løgdu fram, snúði seg í minni mun um tað, sum Inga fyrrapartin hevði sagt um umhvørvisvinarlig gistingarhús, men avdúkaði harafturímóti í stóran mun, hvat lá fundarfólkunum nógv uppá hjartað. Her eru endurtikin nøkur av svarunum hjá bólkunum:

• Í Føroyum kemur ferðafólkið tætt at náttúruni – og fólkinum. Tað er at meta sum ein fyrimunur fyri eitt ferðamannaland.

• Ferðaráðið átti at gjørt meira við at upplýsa um, hvussu ferðafólkið skal bera seg at í náttúruni. Ferðaráðið eigur at hugsa meira um

umhvørvið/náttúruna, tí umhvørvið verður slitið (tráðbrúkt).

• Føroyar áttu at havt eina náttúruumsiting, sum »tók sær av náttúruni« (yvirornað).

Á fundinum varð eisini tjakast um ta ávirkan, sum uppskotið um nýggja jarðarlóg kann hava við sær. Hildið var, at um festigarðar verða ognargarðar, so kann hugsast, at summir eigarar læsa síni økir fyri ferðafólki. Fundarfólkið helt, at Ferðaráðið átti at roynt at gjørt sína ávirkan galdandi fyri at fáa serreglur gjørdar um atgongd. Í Falklandsoyggjunum gjørdist hetta ein trupulleiki, tá garðarnir gjørdust ogn. Summir bøndur vilja nú ikki vita av vitjandi á sínum øki, og fleiri fuglasløg eru nú í vanda fyri oyðing, tí bøndurnir skjóta frá hond við teirri grundgeving, at fuglurin ger seg inn á smálombini. Hesar upplýsingar stava frá Bob Reid, ið arbeiðir innan jarðarumsiting á Falklandsoyggjunum, og sum hevur verið á vitjan í Føroyum.

Í hesum viðfangi varð tosað um ta »lokalu irritatiónina«, ið ferðavinna kann føra við sær úti á bygdunum, men eisini um alt tað positiva, ið fæst burturúr, tá bøndur sjálvir taka lut – og her vórðu tiltøkini hjá Rasmusi Skorheim á Selatrað nevnd sum eitt gott fyridømi. Tá bóndin sjálvur fer í hagan við fólki, stýrir hann í stóran mun ferðafólkastreyminum í sínum haga, og hetta kann haraftrat gerast til eina ískoytisinntøku hjá garðinum.

Undirritaða greiddi á fundinum frá sera áhugaverdu økisætlanini, sum ein arbeiðsbólkur hevur gjørt fyri Ferðaráðið í 1994. Ætlanin, sum er eitt arbeiðsmodel, er skipað soleiðis: á Føroyakortið er avmerkt, hvørji øki eru serliga áhugaverd antin fuglafrøðiliga, plantufrøðiliga ella jarðfrøðiliga. Samstundis er teknað á kortið, hvørji økir áttu at fingið frið, av tí at tey eru serstaka viðbrekin ella varðveitingarverd. Út frá hesum kunnu ferðavinnutiltøk beinast til økir, ið eru serliga spennandi ella hava fakligan áhuga hjá ferðafólki, og samstundis kann kortið vísa, hvørji øki eiga at fáa frið fyri øllum ferðavinnutiltøkum – og hesum áttu ferðasmiðir síðan at rætta seg eftir. Tað er stórt spell, at henda ætlan ongantíð hevur verið brúkt í verki. So leingi vit onga lóggávu hava, ið forðar óskynsamari nýtslu av náttúruni í Føroyum, kundi hetta verið ein ávegis umbót í so máta.

Tosað varð um, at gøtufaldararnir, sum Ferðaráðið gevur út, hava verið væl umtóktir og nógv brúktir. Undirritaða fegnaðist á fundinum um, at Ferðaráðið hevur játtað at taka leiðbeiningarnar, sum vóru á upprunaliga uppskotinum til hesar faldarar, við, tá prentað verður næstu ferð. Vegleiðingarnar snúðu seg um, hvørji fyrilit eiga at verða tikin, áðrenn ein fer hagatúr (veðrið, klæðir o.s.fr.). og um rættan atburð í bø og haga.

Nógv gongd hevur verið á gøtuni millum Fuglafjørð og Hellurnar, síðani faldarin um hesa gøtu kom út, og fuglfirðingar siga, at longu nú ber til at siga, hvat hendi við heiðafuglinum, tá gongdin á gomlu bygdagøtuni øktist. Í fyrstani órógvaðist fuglurin, og reiður, ið áður lógu fram við gøtuni, avoyddust. Men skjótt varnaðust teir, at fuglurin fjølgaðist nakað burtur frá, og sum frálíður, nærkast reiðrini aftur gøtuni, tí fuglurin venur seg skjótt við hesa gongd av fólki eftir somu leið.

Á seinastu fundunum hjá Ferðaráðnum hevur ofta verið tosað um at víðka »sæsonina«, soleiðis at bæði mai og august verða háárstíð. Fuglafrøðifelagið eigur at hugsa um, at ferðafólkatíðin tá eisini fer at fata um kleikingartíðina hjá fugli. Einki ítøkiligt er tó hent á hesum øki enn, uttan tað at hotellini longu hava størri vitjan uttan fyri háárstíðina, men tá er oftast talan um ráðstevnugestir.

**Annað frá aðalfundinum**

Mín egna áskoðan er, at ferðavinna í Føroyum eigur at vera framd út frá føroyskum fortreytum. Slíkt sum at marknaðarføra flógvabilin hjá Schwarzkopf til at koyra í fjøllunum við – hetta hendi í november 1996 – skuldi verið bannlýst, eins og øll onnur motorferðsla í haganum átti at verið bannað, ella ið hvussu so er bert loyvd eftir umsókn, tá serligur tørvur er. Massaturisma eftir útlendskari mynd og motoriserað turisma í okkara fjøllum eigur ikki at vinna frama her, og sum ferðaleiðari kann eg siga tað vera eyðsýnt, at hetta er ikki tað, sum fremmandafólk vilja uppliva, tá tey keypa sær ein ferðaseðil til Føroya.

Mítt ynski er, at allir føroyingar fara at standa saman um at verja náttúruna móti sliti og misnýtslu. Sum er, hugsa tey, ið vinna sær pening av ferðavinnuni, ikki fyribyrgjandi, og ein vansi er eisini, at nógv av teimum, ið fremja ferðavinnu – t.v.s. skipa fyri og stýra tiltøkum frá sínum skriviborði – ikki kenna landið og náttúruna nóg væl á egnum skinni. Tað eru tískil onnur, ið mugu reisa kravið um javnvág millum BRÚK og ÁBYRGD – og her átti okkara felag at havt ein virknan leiklut.

*Tórshavn, tann 30. januar 1999*
*Bette Johansen*

# Útferðin til Gásadals

**í mai 1997**



Øll samlaði. *Mynd: Poul Magnussen*

Tað var við ikki so sørt av væntan og spenningi eitt spelkið ferðalið var á veg vestur í Vágar fríggjakvøldið 24. mai 1997. Veðrið var frálíkt og neyvan nakar av okkum hevði keðiligu veðurvánirnar fyri leygardagin í tonkunum, tá vit hittust á kaiini í Vestmanna. Koyrt varð út á endan av Bíggjarvegnum og so til gongu Gásadalsbrekkuna niðan á Skarðið. Hetta var einans tann fyrsta brekkan av mongum. Uppi við varðan á Skarðinum var útsýnið frálíkt við vesturskyninum roðandi yvir Gásadal og Heinanøvu. Kringluta undanbrekkan niður í Gásadal var ikki fyri veik hálvgomul knø, ið fleiri av okkum høvdu, men niður komu vit so í øllum góðum.

Nú var liðið so langt út á kvøldið, at skjótt var farið til songar, tí vit skuldu tíðliga á føtur morgunin eftir, og væl lógu vit í summarhúsunum, ið Heðin og Jutta høvdu lænt. Veðrið leygardagin var hampuligt um morgunin við mjørka í erva, og fyri mín part skal eg ikki dylja, at eg var eitt sindur ivingarsamur, tá ið Heðin legði á gøtuna út í Berg vestan fyri Bygdina, tí tað var eitt sindur bratt í byrjanini í øllum førum. Men gøtan var góð og breið at ganga á, og tað hjálpti, at Jutta var fullkomuliga ónervað, hóast hon hevði stav at stiðja seg við. Minnist at Heðin nevndi, at abbi Juttu, Frants í Tøðuni og aðrir høvdu grivið gøtuna nærmast úr vøllinum, tvs. teir høvdu breiðkað eina annars



Jutta, Alma og Kristin á veg upp av Víkum. *Mynd: Poul Magnussen*



Kristin og Jóannis úti í Kistu. Annars sæst niður á Víkar. *Mynd: Poul Magnussen*

nógv smalri rás, og tað kemur væl við, tí tað var bratt niðurfyri nógvastaðni. Komin út í Hvanndal var ein lítil steðgur, meðan ein drekkamunnur fór niðurum. Leiðin gekk so líðandi uppeftir á Mannsetri og út eftir Rákagøtuni. Longur vesturi yvir Barðinum vóru vit komin upp í mjørkan, og tá fóru vit upp gjøgnum eina gjógv uppá Stíar og uppá slætt. Annars møguliga frálíka útsýnið á Barðinum var av ongum vegna mjørkan, og vit sóu onki, fyrr enn vit vóru komin oman av aftur, á veg oman í Rygsvíkina. Tað er torført at meta um, hvussu ovarlaga vit hava verið vegna mjørkan, ið lá í erva, men verður hugt fyri juli mánaða í myndakalendaran 1998 sæst, at har er bratt at koma omanav, men stórsligið. Tað er drúgt at ganga á stóru fløtuni úti á Víkum og Rigsvíkini, og ikki so sørt bergtakandi við høga fjallinum omanfyri við teimum stóru gjáunum, ið neyvan finnast aðrastaðni í Føroyum. Skal ein føla seg lítlan í mun til veldugu náttúruna, so er at fara á Víkar. Aftanfyri sást Nýggjaberg og Reipsáfossur, og øll oyggin, sum hon er gevur eina kenslu av, at her er vítt at fara fyri tann sum hevur hug. Lítil vandi er fyri at verða yvirrunnin av fólki, tí flestu øki liggja so langt frá alfaravegi. Komin á Tjørnunes fingu vit okkum ein bita í einum seyðahúsi, ið hevði ein góðan køk. Steðgurin kom væl við, tí mínir knoglar vóru í øllum førum moyrir. Frá Tjørnunesi var gingið niðan í Stropurð, ið var ein ordans urð við stórum steinum, ið vóru torførir at ganga ígjøgnum. Lundi eigur í henni, men tað sást ikki nógv til tað so tíðliga á árinum. Minnist at Heðin vísti okkum á ein vallaðan blett omanfyri í berginum, har ein ær við lambi vóru komin at ganga í, einaferð fyri nøkrum árum síðani. Hvat har er farið fram, er ein góður spurningur, tí har er so at siga



Alma og Jutta í Strupurð. *Mynd: Poul Magnussen*

ikki framkomandi hjá teimum av sær sjálvum. Tey sluppu ikki uppaftur, og tá alt var avetið fóru tey niðurfyri áðrenn veturin kom. Frá Stropurð varð gingið niðriundir Nýggjurð niðan við Lambagjógv. Lendið er nóg so bratt har vit vóru og fleiri stórar gjáir eru upp av Víkum, og upp er m.a gangandi við Lambagjógv um tú skal til Gásadals og Sniðgarð um tú skal til onkra av hinum bygdunum. Eg sigi ikki Kálvi í Feðgar á ferð ringan fyri, at hann so treyðugt vildi fara á Víkar. Hann er í øllum førum ikki farin upp við Lambagjónni, tí brattari mótbrekka enn hon skal ein fara langt fyri at finna, ja heilt vestur á Víkar. Hóast Erik rann upp gjøgnum hana, so vóru vit flest onnur noydd at ganga fót fyri fót, og drúgt og tungt var, men upp komu vit so øll. Næstan heilt har uppi stakk eitt slag av einari nøv út úr nevnd Kista, og teir djarvastu fóru út á hana, og útsýnið harfrá niður á Víkar hevur verið av teimum heilt góðu. Líka so skjótt vit vóru komin uppá, so vóru vit aftur í mjørkanum og sirminum, og undanaftur komin í Dalinum sóu vit Gásadal. Eg haldi klokkan var umleið fýra tá ið vit komu aftur, so vit høvdu verið burtur í einar seks



Jutta og Harald á gøtuni út í Berg. *Mynd:Poul Magnussen*



Út í Berg, áðrenn Hvanndal.

*Mynd: Poul Magnussen*

tímar, og døgurðin seinni, ið Jutta og systurin Alma gjørdu, var góður. Líkindini sunnudagin vóru verri enn leygardagin, so flestu fólk hildu seg innandura, til vit fóru avstað. Gongan upp úr Gásadali eftir bygdargøtuni var tung, og minnist meg rætt, so hevur hetta verið eftir kl.15.00 sunnudagin 25. mai, tí fótbóltur var í útvarpinum, og eg royndi at halda meg til Kristin, sum hevði eitt útvarp við. Útvarpið var í Gundadali til dystin B36-ÍF, og meðan vit gingu uppeftir rapaðu málini inn hjá ÍF, ið tapti 8-3, og tað tyktist fyri mær, sum um hvørt málið tyngdi um hjá Kristini.

Nú tað líðir móti tveimum árum síðani vit vóru har vesturi, er ikki so lætt at fáa ymiskt fram í minnið. Heðin var ein góður ferðaleiðari, dugdi væl at greiða frá, og eg minnist konuna hjá Heðini, Juttu, peikandi við stavinum, tá ið hon skuldi vísa á eitt ella annað. Har vóru fleiri prátingarsom fólk, m.a formaðurin Petur og Ditlev. Øll vóru líka hugnalig og fitt, so hetta var ein væl fyriskipaður og væl eydnaður túrur, hóast veðrið snýtti okkum, um so kann sigast leygardagin.

Nú var hetta Føroya Fuglafrøðifelag, so ein skuldi trú, at øll vóru ør eftir at síggja fuglar, og fyrsta klippið fekk øll at hitna. Neyvan hevði so verið, og fuglar vóru tíanverri ikki í meingi. So vítt eg minnist so sóu vit ikki eina steinstólpu,

hvørki sóu ella hoyrdu láir, hoyrdu onkran spógva ovarlaga í dalinum, tá ið vit komu aftur, og tjøldrini vóru fá. Á Víkum vóru afturfyri eini 4-5 grágásapør kanska fleiri, ið vit stygdu av reiðrinum, og styggar vóru tær, tí tær fóru ikki á reiðri aftur, men flugu høgt uppiyvir longi eftir, at vit vóru farin framvið. Vit sóu eisini eitt villdunnureiður.

Nøkur skúgvapør vóru eisini har, onkur segði, at væl meira hevði verið av skúgvi, men skotið varð burtur av, fyri at halda honum niðri. Grágæsnar og skúgvurin vóru møguliga mest spennandi fuglarnir, um ein kann siga soleiðis, tí fyri okkum eru væl allir líka spennandi, eisini ravnarnir, ið gorrandi vóru omanfyri okkum, meðan vit gingu eftir Slættanum á Víkum. Um eg skal ella kann siga nakað, ið kanska kann vera betur eina aðru ferð, so lá



Ein vælnøgdur formaður á Víkum. *Mynd: Poul Magnussen*



Heðin hyggur upp í bergið.
*Mynd: Poul Magnussen*

túrurin nakað tíðliga, tí gróður var ikki komin í enn, og kanska fleiri fuglar høvdu verið at sæð td. ein mánaða seinni. Hetta var í øllum førum ein túrur, ið fyri mítt viðkomandi er festur í minnið fyri lívið, og hetta verður ikki seinasta ferð eg komi á hasar leiðir, um lagnan vil.

*Poul Magnussen*